**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 30/2012: Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2013**

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 28. september 2012, og eftir 1. viðgerð 4. oktober er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á 13 fundum.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við

Kaj Leo Holm Johannesen, løgmann
Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fíggjarmálum
Karsten Hansen, landsstýrismann í heilsumálum
Bjørn Kalsø, landsstýrismann í mentamálum
Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum
Johan Dahl, landsstýrismann í vinnumálum
Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í almannamálum
Kára P. Højgaard, landsstýrismann í innlendismálum

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bárður Nielsen, Bill Justinussen, Jákup Mikkelsen og Rodmundur Nielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá sitandi samgonga tók við leiðslu landsins, var eitt av høvuðsmálunum at fáa tamarhald á almenna búskapinum. Semja er í samgonguni um, at hallið skal minkast, soleiðis at avlop verður aftur á fíggjarlógini í 2016.

Til tess at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 skulu stórar nýskipanir fremjast í almenna bygnaðinum komandi árini. Hetta er galdandi fyri bæði inntøku- og útreiðslusíðu. Harumframt er eisini neyðugt at halda áfram við rationaliseringum og samanleggingum í almenna geiranum. Neyðugt er at fáa sum mest fyri hvørja skattakrónu.

Við hesum fíggjarlógaruppskotinum hevur samgongan hildið seg til avtalaða politikkin. Meðan flestu av grannalondum okkara framvegis kenna sviðan av alheims fíggjarkreppuni, tykist føroyski búskapurin at hava fótað sær. Arbeiðsloysið minkar og privatu húsarhaldini niðurgjalda skuld. Við verandi politikki megna vit at framtíðartryggja vælferðarsamfelagið og hevur verið rúm fyri uppraðfestingum serliga á eldraøkinum. Harumframt eru ongantíð áður tiknir so nógvir næmingar inn á miðnám.

Framlagda uppskotið hevði eitt undirskot upp á 378,1 mió. kr. Partvíst eftir uppskoti frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum hevur meirilutin minkað undirskotið við 135,9 mió., soleiðis at undirskotið við hesum uppskoti verður 242,2 mió. kr. Talan er serliga um øktar

inntøkur frá tilfeingisgjaldi/-skatti upp á 120 mió. kr. Útreiðslurnar eru lækkaðar eitt vet í mun til framlagda uppskotið.

Í fjør var við ársenda nærum kr. 90 mió. støðlaðar av peningi, ið var ætlaður at nýta til íløgur í 2011. Hetta talið verður í ár væntandi vaksið til kr. 142 mió. Nevndin heldur hetta vera sera óheppið, tí í stóran mun hevur Løgtingið lagt dent á, at løgur skulu vera virksemisskapandi fyri at stimbra búskapin, nú lágkonjunkturur er.

Meirilutin hevur tí í sínum broytingaruppskoti roynt at flyta játtan til tær løgur, sum væntast at verða framdar.

Fíggjarnevndin vísti í álitinum til seinastu fíggjarlóg á, at C-átekningar verða brúktar í ov stóran mun. Tá umræður íløgur, tæna C-átekningar bert endamálinum, tá talan er um ítøkiligar verkætlanir, har ein samlað upphædd er ásett í verklagslóg. Meirilutin heldur fast í hesum sjónarmiði og hevur tí valt at strika C-átekningar, har eingin verklagslóg er, ella har sum verkætlanin ikki er virkin.

Fíggjarnevndin vísti í álitinum til seinastu fíggjarlóg eisini á, at viðmerkingarnar til eina C-átekning, ið heimilar flyting millum kontur, eigur at lýsa, hvat endamálið er við flytingini, og at avmarking er í upphæddini. Har hetta ikki er gjørt, hevur meirlutin valt at strika hesar.

| | | *Útreiðslur* | *Inntøkur* |
|---|---|---|---|
| *01-10.1.03.* **Løgtingsarbeiði** | Rakstrarj. | 400 | |

Í sambandi við, at Norðurlandaráðið heldur fund í Føroyum í september, verður neyðugt at hækka játtanina. Harumframt skulu arbeiðsumstøðurnar í Løgtinginum betrast..

| | | *Útreiðslur* | *Inntøkur* |
|---|---|---|---|
| *02-11.1.02.* **Løgmansskrivstovan** | Rakstrarj. | | 500 |

Meirilutin heldur, at sendistovur okkara eiga at hava møguleika fyri inntøkufíggjaðum, virksemi.

Løgmaður hevur boðað frá, at hann hevur ætlanir um at seta á stovn sendistovu í Moskva. Meirilutin hevur ta viðmerking, at hetta ikki má nerva aðrar sendistovur.

| | | *Útreiðslur* | *Inntøkur* |
|---|---|---|---|
| *03-11.1.03.* **Fíggjarmálaráðið** | Rakstrarj. | 1.000 | |

Undirkonta 25 Verkætlanir:
Í 2013 verður játtað 1 mió. kr. til verkætlan um talgildar roknskapir. Verkætlanin skal ætlandi frá 2014 at rokna spara TAKS 1 mió. kr. um árið í fyrisitingarkostnaði vegna minni arbeiði av at móttaka roknskapir. Henda játtan er av misgávum ikki tikin við í uppskotinum.

| | | *Útreiðslur* | *Inntøkur* |
|---|---|---|---|
| *03-11.1.36.* **Sáttmálaviðurskifti** | Rakstrarj. | -300 | |

Játtanin verður mett at kunna lækkast við 300 tús. kr., sum eisini er í samsvari við framskrivingarnar í sambandi við játtanarkarmarnar fyri 2013. Orsøkin er, at mett verður, at talið av semingsroyndum verður lægri í 2013 vegna longri varandi sáttmálar við fleiri av fakfeløgunum.

Átekning
Landsstýrismanninum verður heimilað at rinda fráfarnum sendimanni eina upphædd, ið samsvarar við munin millum tað, hann rindar í skatti til Føroyar við avmarkaðari skattskyldu, og tað, hann hevði rindað, um hann var búsitandi í Føroyum. Upphæddin í 2013 er 21 tús. kr.

***03-15.1.04.*** **TAKS** Rakstrarj. 1.000

Vegna hægri rakstrarkostnað av KT-skipanunum, sum koyra á Elektron, inntil umleggingin er framd, so verður játtanin til KT-skipanirnar í 2013 og 2014 hækkað við 1 mió. kr.
Komið er eisini eftir, at játtanin til vanliga virksemið hjá TAKS fyri árini 2014 og 2015 er 600 tús. kr. ov lág, og verður játtanin hjá TAKS hækkað hesi árini við hesi upphædd.

Undirkonta 24. EDV-skipanir hjá TAKS
Síðani 1980-árini eru KT-kjarnuskipanirnar hjá TAKS støðugt útbygdar, riknar og viðlíkahildnar av hesi játtan. Skipanirnar fevna í dag um fakskipanir til skatt, toll og avgjøld, undir hesum eisini býtið millum land og kommunur. Hetta merkir, at skipanirnar hjá TAKS hava sera avgerandi týdning fyri landið, tí tær tryggja innkrevjing og eftirlit við meginpartinum av inntøkum landskassans.

Síðan fyrsta skipanin varð ment á eini Mainframe-skipan hjá Elektron í 1980unum, hava hesar skipanir verið knýttar at, og avmarkaðar av, teimum møguleikum, sum finnast á hesum palli. Síðan føroysku peningastovnarnir í 2010 valdu at flyta raksturin av teirra skipanum frá Elektron til SDC, er árligi rakstrarkostnaðurin av skipanunum øktur við 1,9 mió. kr. um árið (frá 5 mió. til 6,9 mió.), Tó hevur TAKS kunnað sent ein part av eykarokningini víðari til grunnar og onnur, sum TAKS arbeiðir fyri, soleiðis at nettoútreiðslan hjá TAKS hevur verið 1,4 mió. kr., sum TAKS hevur fingið játtað sum eykajáttan.

Hesin eyka kostnaður er framvegis galdandi fyri árini 2013 og 2014, og tí hækkar KT-játtanin hjá TAKS fyri hesi árini. Tó verður játtanin bert økt við 1 mió. kr., tí Elektron væntandi letur ein avsláttur í eykarokningini á uml. 400 tús. kr. Rætting er eisini gjørd í inntøkunum á 500 tús. kr. fyri árini 2013 og 2014, sum samsvarar við tann partin av eykarokningini, sum verður send víðari til grunnar, Heilsutrygd og onnur.

TAKS hevur í hesum tíðarskeiði fleiri ferðir roynt at fáa játtað pening til at flyta kjarnuskipanina frá hesum gamla og dýra palli yvir á nýggjari og bíligari pall. Mett verður, at tílík umlegging hevur sparing við sær á 4 mió. kr. árliga.

TAKS arbeiðir við einum nýggjum uppskoti til umlegging, sum fer at hava við sær, at TAKS í 2013, 2014 og 2015 verður bundið av eini umlegging av øllum kjarnuskipanunum hjá stovninum, um so er, at peningur verður játtaður til uppgávuna. Brúktar eru 1.450 tús. kr. í 2012 til at nágreina verkætlanina, og mett verður, at í mesta lagi 23.550 tús. kr. eru eftir. Hetta verður fíggjað soleiðis, at á fíggjarlógini verða avsettar 5 mió. kr. í 2013, 5 mió. kr. í 2014 og 4,0 mió. í 2015, umframt at peningastovnarnir rinda 7,5 mió. kr., og Elektron veitir ein avsláttur á 1 mió. kr. Restina, 1,05 mió. kr., rindar TAKS sjálvt av egnum KT-rakstri, og hevur hetta við sær, at minni av aðrari KT-menning ella tillaging verður á TAKS í 2013 og 2014.

Verkætlanin hevur við sær bíligari KT-rakstur, men broytir ikki KT-skipanina hjá TAKS, og tí er neyðugt, at sparingin í KT-rakstrinum frá 2015 at rokna fyri ein part verður tøk hjá TAKS at brúka til at nútímansgera skipanirnar soleiðis, at tær verða meira tíðarhóskandi.

Í 2013 fer TAKS harumframt at arbeiða við at íverkseta nýggju eftirlønarlógina, sum helst verður løgd fyri tingið á heysti 2012 at koma í gildi 1. januar 2014. Málið hjá TAKS er at menna eina skipan, ið kann tryggja, at inngjaldingin til eftirlønarskipanina í størst møguligan mun fer fram sjálvvirkandi soleiðis, at lógin hevur við sær minst møguligt av umsitingarligum arbeiði.

**03-15.1.07. Føroya gjaldstova** Rakstrarj. -900

Undirkonta 30. Umsiting av gjaldføri og skuld landsins

Frá 2013 yvirtekur gjaldstovan umsitingina av gjaldføri og skuld landsins frá landsbankanum. Í hesum sambandi vórðu avsettar 5,8 mió. kr. til hesa undirkontu frá 2013. Talan er um játtan, sum áður hevur verið bókað sum ein útreiðsla á høvuðskontu 20.50.2.01 Rentuinntøkur av innistandandi. Upphæddin verður lækkað við 900 tús. kr., sum samsvarar við ta árligu upphæddina, sum hetta virksemið áður er vorðið álagt at rinda í lønhæddargjaldi og meirvirðisgjaldi, men sum íkki er partur av játtan hjá stovni í fíggjarlóg. Eisini verður tikin við samsýning og kostnaður av íløgurøkt fyri almennar grunnar.

**03-18.1.01. Tænastumannaeftirlønir** Lógarbundin -1.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka við 1.000 tús. kr. í 2013

**03-18.1.04. Læraraeftirlønir** Lógarbundin j. -500 150

Nýggjar framrokningar vísa, at nettojáttanin kann lækka við 650 tús. kr. hvørt av árunum 2013, 2014 og 2015.

**03-18.1.07. Eftirlønir innan heilsuverkið** Lógarbundin j. -400

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lække við 400 tús. kr. hvørt av árunum 2013, 2014 og 2015.

**03-21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald** Lógarbundin j. -250

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lække.

**05-34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið** Rakstrarj. -10.400

Í sambandi við ætlanir um at skipa eitt alment reiðarí, verður skiparaksturin hjá fiskiveiðieftirlitinum fluttur til serstaka høvuðskontu nr. 34.2.03.

**05-34.2.03. Rakstur av vaktarskipunum** Rakstrarj. 10.400

Játtanin er flutt frá fiskiveiðieftirlitinum. Meirilutin vísir á, at hetta er fyrsta stigið í eini tilgongd at skipa eitt felags alment reiðarí.

**06-36.1.04. Havbúnaðarroyndir** Stuðulsj. -500

Meirilutin heldur, at vinnan eigur at hava ein virknari leiklut í vinnuligari gransking.

**06-37.5.04. Heilsufrøðiliga Starvsstovan** Rakstrarj. 500

Meirilutin heldur tað vera neyðugt at geva Heilsufrøðiliga Starvsstovuni møguleikar til at menna fyrireikingararbeiðið í sambandi við okkara útflutningsvinnu.

**06-39.4.01. Barsilsskipan** Lógarbundin j. -5.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lække.

**07-23.3.02. Studentaskúlin og hf-skeiðið í Eysturoy** Løguj. 2.000

Óbrúkt játtan verður flutt fram til 2013.

**07-23.3.09. Skúladepil við Marknagil** Løguj. -18.500

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at støðlaðar verða kr 74 mió. við ársenda 2012. Saman við játtan 2013 verður játtaða upphæddin íalt kr 134 mió., og væntar meirilutin ikki, at allur hesin peningur verður brúktur í 2013.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ***07-23.7.05.*** **Lestrarlán** | Stuðulsj. | 300 | 1.000 |

Við at herða lánstreytirnar eftir loknan lestur, ber til at fáa størri inntøku.

| | | |
|---|---|---|
| ***07-24.1.13.*** **Ymiskir studningar** | Stuðulsj. | -200 |

Játtanin verður flutt til Hugasamband Føroya.

| | | |
|---|---|---|
| ***07-24.4.06.*** **Kringvarp Føroya** | Rakstrarj. | 1.900 |

Játtanin til Kringvarp Føroya verður í 2013 hækkað við kr. 2,2 mió. fyri at minka um ávirkanina av tí neyðuga niðurskurðinum, ið Kringvarpið noyðist at gera við árslok 2012.

Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um Kringvarp, kann virksemið hjá Kringvarpi Føroya eisini verða fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini. Hetta er tó ikki vanligt og verður gjørt av serstøkum umstøðum.

Kringvarpið má niðurlaða starvsfólkatalið, soleiðis at javnvág aftur fast millum inntøkur og útreiðslur. Inntøkurnar frá kringvarpsgjaldi øktust við lógarbroytingini frá 2010, men økingin hevur ikki uppvigað lækkingina í inntøkunum frá lýsingum og spæli.

Uppsparingin, sum stovnurin hevur havt, er burtur, eftir at stovnurin hevur havt áhaldandi árligt undirskot, og nýggjar roknskaparmeginreglur hava kravt fleiri avskrivingar.

Stig eru tikin til at fáa javnvág í raksturin í 2013, og játtanin á fíggjarlógini skal tryggja eina lagaliga yvirgongd til lægra starvsfólkatalið.

Alt virksemið hjá Kringvarpi Føroya verður savnað í Sortudíki so skjótt sum møguligt á vári í 2013. Partur av hesi játtanini skal nýtast til loysnina at savna øll starvsfólkini í Sortudíki. Hetta fer at viðføra møguleikar fyri einum effektivari rakstri hjá samanlagda stovninum.

Ætlanin er, at bygningarnir hjá Kringvarpinum í M.A.Winthersgøtu, kallað Vørðslan, verða lýstir til sølu sum skjótast. Teir verða seldir undir fyrivarni av Løgtingsins góðkenning av søluni, og at søluinntøkurnar kunnu verða brúktar til bygging í Sortudíki. Sølan verður tikin upp við Løgtingið, so skjótt sum mett verður, at eitt nøktandi tilboð fyriliggur.

| | | |
|---|---|---|
| ***07-24.6.08.*** **Hugasamband Føroya** | Stuðulsj. | 200 |

Játtanin verður hækkað við kr. 200 tús.

| | | |
|---|---|---|
| ***11-20.2.02.*** **Heilsutrygd** | Rakstrarj. | -500 |

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

| | | |
|---|---|---|
| ***11-20.2.03.*** **Heilsutrygdarveitingar** | Rakstrarj. | -2.500 |

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

| | | |
|---|---|---|
| ***11-20.3.04.*** **Landssjúkrahúsið** | Rakstrarj. | 400 |

Játtanin skal nýtast til sjúkraflutningstænastuna til Sandoynna.

| | | |
|---|---|---|
| ***11-20.3.11.*** **Klaksvíkar sjúkrahús** | Løguj. | 3.000 |

Óbrúkt játtan verður flutt fram til 2013.

| | | |
|---|---|---|
| ***12-21.1.02.*** **Almannaverkið** | Rakstrarj. | -100 |

Játtanin verður lækkað við 100 tús. kr., sum verða fluttar til høvuðskontu 12.21.1.19.

Ráðgeving fyri føroyingar í Danmark.

***12-21.1.07.*** **Hjálpartólamiðstøðin** Rakstrarj. -500

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

***12-21.1.09.*** **Dugni-skúlin** Løguj. 400

Óbrúkt játtan verður flutt fram til 2013.

***12-21.1.12.*** **Endurmenning** Rakstrarj. -200

Játtanin verður lækkað við 200 tús. kr., sum verða fluttar til høvuðskontu 12.21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum, undirkontu 10. Fountain hús.

***12-21.1.19.*** **Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark** Stuðulsj. 200

Játtanin til Ráðgeving fyri føroyingar í Danmark varð lækkað við 100 tús. kr. á fíggjarlógini fyri 2012. Neyðugt verður at hækka játtanina í 2013, um Ráðgevingin skal kunna fíggja bundnar útreiðslur.

***12-21.1.22.*** **Stuðul til feløg** Stuðulsj. 300

Avsettar eru 200 tús. kr. til at stuðla stovnseting ella verkætlan av einum arbeiðsrættaðum tilboði til persónar, sum eru sálarsjúkir ella hava sálarligar trupulleikar, við Fountain hús sum fyrimynd. Stuðulin verður latin við ávísum treytum, sum verða ásettar í reglugerð.

Harumframt verða avsettar kr. 100.000 til hjálparfelagsskapin KRIS.

***12-21.3.01.*** **Barnavernd** Lógarbundin j. -500

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

***12-21.3.05.*** **Stuðul til uppihaldspening** Lógarbundin j. -1.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

***12-21.3.08.*** **Børn og ung** Rakstrarj. 500

Játtanin verður brúkt til at menna tilboð til børn við menningartarni á Sandoynni.

***12-21.4.01.*** **Dagpeningaskipanin** Lógarbundin j. -2.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

***12-21.6.02.*** **Bústovnar o.a.** Løguj. -4.100

Játtanin kr. 4,0 mió. er til at høvuðsumvæla Ellis- og røktarheimið í Vágum. Játtanin er treytað av, at semja um fíggjarliga býtið verður fingin millum avvarðandi kommunur og Almannamálaráðið. Umvælingin verður skipað í verklagslóg.

Játtanin til bygging av vardum bústøðum í Norðoyggjum og Eysturoynni til fólk við serligum tørvi, verður lækka við kr. 8,1 mió.

***12-21.6.10.*** **Ansingarsamsýning** Lógarbundin j. -1.500

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

***12-21.8.01.*** **Fólkapensjón** Lógarbundin j. 3.500

Sum avleiðing av, at lógarbroyting er framløgd í tinginum viðvíkjandi mótrokning millum hjún, verður játtanin hækkað.

**12-34.4.04. Sjúkratrygd** Lógarbundin j. -1.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

**15-11.1.23. Landsins ognir** Rakstrarj. 1.100

Virksemið hjá Færøernes Kommando verður niðurlaðað í Føroyum.

Samráðingar eru um, at landsstýrið yvirtekur ognirnar hjá verjuni í Føroyum, uttan viðurlag (ókeypis). Miðað verður eftir, at landsstýrið ger sáttmála við ríkismyndugleikarnar, har landsstýrið tekur við ábyrgdini av ognunum frá 1. januar 2013 at rokna. Talan er um hernaðarstøðirnar í Mjørkadali og á Sornfelli, umframt kommandørbústaðin yviri við Strond.

Fíggjarlig heimild er neyðug til tess at yvirtaka og reka ognirnar. Ein rakstrarjáttan til at reka bygningarnar (henda játtanin), og ein løgujáttan til at yvirtaka bygningarnar frá donskum myndugleikum. Sí høvuðskontu 15.11.1.57. Yvirtøka av ognum frá Færøernes Kommando.

Árligu rakstrarútreiðslurnar eru umleið 2,1 mió. kr, meðan inntøkurnar frá leigumálum eru 1,0 mió. kr. Rakstrarútreiðslurnar (netto) eru sostatt umleið 1,1 mió. kr. árliga.

**15-11.1.56. Umvæling av almennum bygningum** Løguj. -1.100

Játtanin til umvæling av almennum bygningum verður lækkað við 1,1 mió. kr., soleiðis at játtanin verður 25,4 mió. kr. í 2013.

**15-11.1.57. Yvirtøka av ognum hjá Færøernes** Løguj. 23.000 23.000

Eftir ætlan yvirtekur landsstýrið ognirnar hjá Færøernes Kommando 1. januar 2013 uttan viðurlag. Landsstýrið fer sostatt at eiga og reka ognirnar. Talan er um herstøðirnar í Mjørkadali og á Sornfelli, umframt kommandørbústaðin yviri við Strond.

Danska verjumálaráðið hevur virðismett ognirnar til 23,0 mió. kr. samanlagt. Virðismetingin byggir á eitt mett handilsvirði í fríari sølu fyri ognirnar.

Í Mjørkadali fevna ognirnar um høvuðsbygningin og tilhoyrandi bygningar, sum verða virðismettir til 20,0 mió. kr. Ognirnar á Sornfelli fevna um sjálvan bunkaran inni í fjallinum, kuplarnar og annað. Tað er trupult at meta um møguligt handilsvirði, og er tað tí ikki ásett. Kommandørbústaðurin verður mettur til 3,0 mió. kr.

Løgujáttanin er ein útreiðsluneutral játtan, sum heimilar yvirtøkuna av ognunum hjá Færøernes kommando.

**15-37.4.02. Umhvørvisstovan** Rakstrarj. -200

Meirilutin metir, at játtanin til Umhvørvisstovuna kann lækka við kr. 200.000.

**15-38.1.02. Landsverk** Rakstrarj. -1.000

Nýggjar framrokningar vísa, at játtanin kann lækka.

**15-38.1.07. Nýggir landsvegir** Løguj. 13.500

Til vegaføring oman fyri Skálafjørð verða kr. 7 mió. settar av

Íbinding við Sjógv í Kollafirði

Kr. 3 mió. verða settar av til at bøta um ferðslutrygdina í sambandi við íbindingina við Sjógv í Kollafirði.

Øravík- Hov
Tá tunnilin Øravík- Hov varð gjørdur, varnaðist Landsverk, at portalurin Øravíkarmegin, ikki var gjørdur sum avtalað.

Landsverk kom eftir, at nakrar tekningar hjá prosjekteringsfelagnum ikki vóru rættar, sum merkti, at lendið omanfyri portalin gjørdist ov bratt og ov sjónligt. Einasti máti at rætta brekið var eftirfylgjandi at leingja portalin og gera aðrar neyðugar tillagingar fyri at lúka ásett krøv.

Hetta hevði við sær ein meirkostnað upp á 3,5 mió. kr., og setti Landsverk fram krav til prosjekteringsfelagið í 2009 um at gjalda hesa upphædd. Landsverk inntøkuførdi 3,5 mió. kr. í hesum sambandi.

Prosjekteringsfelagið var ikki sinnað at gjalda, og eingin semja fekst í lag. Málið varð tí lagt fyri gerðarrættin, sum fyri kortum avgjørdi at frídøma prosjekteringsfelagið. Tað merkir, at Landsverk sleppir kravinum móti felagnum og má útreiðsluføra 3,5 mió. kr. í 2012.

***15-38.1.14.* Havnir** Løguj. 3.000
Til at umvæla botnin við ferjuleguna á Krambatanga verða kr. 2 mió settar av, til at betra atkomuviðurskiftini í Svínoy verður kr. 1 mió sett av

***15-38.4.01.* Akstovan** Rakstrarj. 425
Til at økja um virksemið hjá Akstovuni verður játtanin hækkað

***15-38.4.02.* Akstovan** Løguj. 1.000
Akstovan sýnar persónbilar og vørubilar í einum leigumáli í Saltangará, meðan lastbilar, bussar og stór viðfest akfør, samanlagt 240 akfør, verða sýnað í Havn. Akstovan hevur møguleika fyri at leiga eina høll beint við síðuna av verandi høll, sum hóskar væl til at sýna stór akfør. Um tikið verður av tilboðnum, kunnu øll akfør í Eysturoynni, sýnast á staðnum. Eysturoyggin er næststørsta sýnisøki í landinum, og er tað ein stórur fyrimunur, um bileigarar kunnu sleppa undan at brúka upp til 4 tímar til av avgreiða sýnini í Havn. Viðmerkjast skal, at fyribils leigusáttmáli er gjørdur, meðan arbeitt verður við eini varandi loysn á málinum.

Fyri at kunna fara undir virksemið er neyðugt at keypa útbúnað og at innrætta nýggja leigumálið fyri umleið 1,0 mió. kr. Av hesum fara umleið 600 tús. kr. til sýnisútbúnað og 400 tús. kr. til innrætting.

***20-52.2.25.* Ferðaavgjald** -3.000
Meirilutin heldur, at ferðaavgjaldið eigur at lækka. Landsstýrismaðurin eigur at gera eina ætlan, so at hetta gjald eftir nøkur ár verður strikað. Til at lækka gjaldið longu í ár verða kr. 3 mió settar av.

***20-52.1.09.* Tilfeingis/loyvisskattur** 13.000
Landsstýrið hevur lagt Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin) (tilfeingis- og loyvisskattur), fyri Løgtingið.

***20-52.2.04.* Tollavgjøld** 3.000
Nýggj meting út frá gongdini í 2012.

***20-52.2.07.* Punktgjøld** -13.000
Nýggj meting út frá gongdini í 2012.

***20-52.2.15.*** **Avgjald á fiskatilfeingi** 107.000

Landsstýrið hevur lagt "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gjøld í sambandi við fiskiskap eftir makreli í 2012" fyri Løgtingið.

***20-52.2.19.*** **Skrásetingargjald** 10.000

Nýggj meting út frá gongdini í 2012.

***20-52.2.25.*** **Ferðaavgjald** -3.000

Fíggjarnevndin heldur, at ferðaavgjaldið eigur at lækka. Fíggjarnevndin heldur, at landsstýrismaðurin eigur at gera eina ætlan, so at hetta gjald eftir nøkur ár verður strikað. Til at lækka gjaldið longu í ár verða kr. 2 mió settar av.

***20-54.1.01.*** **Heildarveiting o.t.** 8.100

Lógaruppskot um heildarveitingina fyri 2013 verður lagt fyri Løgtingið eftir, at samsvarandi fólkatingslóg er samtykt í Danmark. Sambært danska fíggjarmálaráðnum verður roknað við, at fólkatingslógin um heildarveitingina verður samtykt fyrst í komandi árið.

Við hesum viðmerkingum setir ein meirilutin fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 1. Løgtingið

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 400 | 400 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **1.10.1. Løgtingið** | | | |
| 10.1.03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarj.) | U: | 30.165 | - |
| | **BU:** | **400** | **-** |

# § 2. Løgmannsfyristiting

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -500 | - | 500 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **2.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | U: | 32.450 | - |
| | **BU:** | **-** | **500** |

## C. Átekningar

**Nr. 1 11.1.21. Umbygging í Tinganesi (Løguj.)**

Verður strikað

# § 3. Fíggjarmál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -1.500 | -1.350 | 150 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| **3.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 9.689 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.) | U: | 600 | - |
| | **BU:** | **-300** | **-** |
| **3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m.** | | | |
| 15.1.04. TAKS (Rakstrarj.) | U: | 68.587 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |
| 15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarj.) | U: | 31.880 | - |
| | **BU:** | **-900** | **-** |
| **3.18.1. Tænastumannaeftirlønir** | | | |
| 18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin j.) | U: | 22.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 18.1.04. Læraraeftirlønir (Lógarbundin j.) | U: | 62.000 | 23.850 |
| | **BU:** | **-500** | **150** |
| 18.1.07. Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarbundin j.) | U: | 13.500 | - |
| | **BU:** | **-400** | **-** |
| **3.21.2. Útgjaldsskipanir** | | | |
| 21.2.01. Stuðul til flutning og dupult húsarhald (Lógarbundin j.) | U: | 16.000 | - |
| | **BU:** | **-250** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 21 11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.)**

Landsstýrismanninum verður heimilað at rinda fráfarnum sendimanni eina upphædd, ið svarar til munin millum tað, hann rindar í skatti til Føroyar við avmarkaðari skattskyldu, og tað hann hevði rindað, um hann var búsitandi í Føroyum.

# § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| Útr. | Innt. |
|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. | kr. - |

### 5.34.2. Tænasta og eftirlit

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 39.774 | - |
| | **BU:** | **-10.400** | **-** |
| 34.2.03. Rakstur av vaktarskipunum (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **10.400** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 2 33.2.01. Almennar royndir og ráðgeving (Rakstrarj.)**
Verður strikað

**Nr. 3 33.2.03. Búnaðarstovan (Rakstrarj.)**
Verður strikað

**Nr. 4 34.3.01. Havstovan (Rakstrarj.)**
Verður strikað

**Nr. 5 34.3.06. Nýtt havrannsóknarskip (Løguj.)**
Verður strikað

**Nr. 6 34.3.07. Fiskivinnuroyndir (Rakstrarj.)**
Verður strikað

# § 6. Vinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -5.000 | -5.000 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 6.36.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 36.1.04. Havbúnaðarroyndir (Stuðulsj.) | U: | 10.000 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |

### 6.37.5. Almennir karmar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.5.04. Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarj.) | U: | 14.873 | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |

### 6.39.4. Arbeiðsmarknaðartænastur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 39.4.01. Barsilsskipan (Lógarbundin j.) | U: | 88.300 | - |
| | **BU:** | **-5.000** | **-** |

# § 7. Mentamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.200 | 2.200 | 1.000 |
| Løgu ætlan | -13.000 | -13.000 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.3.02. Studentaskúlin og hf-skeiðið í Eysturoy (Løguj.) | U: | 10.000 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løguj.) | U: | 60.000 | - |
| | **BU:** | **-18.500** | **-** |

### 7.23.7. Lestrarstuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.7.05. Lestrarlán (Stuðulsj.) | U: | 13.893 | 10.900 |
| | **BU:** | **300** | **1.000** |

### 7.24.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.1.13. Ymiskir studningar (Stuðulsj.) | U: | 2.030 | - |
| | **BU:** | **-200** | **-** |

### 7.24.4. Fjølmiðlar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.4.06. Kringvarp Føroya (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **1.900** | **-** |

### 7.24.6. Ítróttur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.6.08. Hugasamband Føroya (Stuðulsj.) | U: | 450 | - |
| | **BU:** | **200** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 11 24.2.09. Tjóðleikhús (Løguj.)**
Verður strikað

**Nr. 12 24.3.15. Hvalastøðin við Áir (Løguj.)**
Verður strikað

**Nr. 13 24.3.23. Kirkjubømúrurin (Løguj.)**
Verður strikað

# § 11. Heilsumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.600 | -2.600 | - |
| Løgu ætlan | 3.000 | 3.000 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 11.20.2. Heilsutænastur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.2.02. Heilsutrygd (Rakstrarj.) | U: | 7.800 | - |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 20.2.03. Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarj.) | U: | 150.70 | - |
| | **BU:** | **-2.500** | **-** |

### 11.20.3. Sjúkrahúsverkið

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | U: | 386.04 | - |
| | **BU:** | **400** | **-** |
| 20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løguj.) | U: | 5.000 | - |
| | **BU:** | **3.000** | **-** |

# § 12. Almannamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -2.300 | -2.300 | - |
| Løgu ætlan | -3.700 | -3.700 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 12.21.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.1.02. Almannaverkið (Rakstrarj.) | U: | 44.978 | - |
| | **BU:** | **-100** | **-** |
| 21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin (Rakstrarj.) | U: | 6.951 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 21.1.09. Dugni-skúlin (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **400** | **-** |
| 21.1.12. Endurmenning (Rakstrarj.) | U: | 7.000 | - |
| | **BU:** | **-200** | **-** |
| 21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Stuðulsj.) | U: | 948 | - |
| | **BU:** | **200** | **-** |
| 21.1.22. Stuðul til feløg (Stuðulsj.) | U: | 2.263 | - |
| | **BU:** | **300** | **-** |

### 12.21.3. Barnastuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.3.01. Barnavernd (Lógarbundin j.) | U: | 5.627 | 1.592 |
| | **BU:** | **-500** | **-** |
| 21.3.05. Stuðul til uppihaldspening (Lógarbundin j.) | U: | 4.745 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 21.3.08. Børn og ung (Rakstrarj.) | U: | 48.608 | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |

### 12.21.4. Sjúkradagpeningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | U: | 56.057 | 5.435 |
| | **BU:** | **-2.000** | **-** |

### 12.21.6. Eldri og brekað

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.6.02. Bústovnar o.a. (Løguj.) | U: | 34.500 | - |
| | **BU:** | **-4.100** | **-** |
| 21.6.10. Ansingarsamsýning (Lógarbundin j.) | U: | 14.635 | - |
| | **BU:** | **-1.500** | **-** |

### 12.21.8. Sosialar pensjónir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.8.01. Fólkapensjón (Lógarbundin j.) | U: | 472.45 | - |
| | **BU:** | **3.500** | **-** |

### 12.34.4. Studningur til vinnu

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.4.04. Sjúkratrygd (Lógarbundin j.) | U: | 5.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |

# § 15. Innlendismál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 325 | 325 | - |
| Løgu ætlan | 16.400 | 39.300 | 23.000 |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 15.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.23. Landsins ognir (Rakstrarj.) | U: | -1.246 | - |
| | **BU:** | **1.100** | **-** |
| 11.1.56. Umvæling av almennum bygningum (Løguj.) | U: | 26.500 | - |
| | **BU:** | **-1.100** | **-** |
| 11.1.57. Yvirtøka av ognum hjá Færøernes Kommando (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **23.000** | **23.000** |

### 15.37.4. Ognarskrásetingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarj.) | U: | 21.010 | - |
| | **BU:** | **-200** | **-** |

### 15.38.1. Vegir og havnir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.1.02. Landsverk (Rakstrarj.) | U: | 61.230 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 38.1.07. Nýggir landsvegir (Løguj.) | U: | 37.000 | 100 |
| | **BU:** | **13.500** | **-** |
| 38.1.14. Havnir (Løguj.) | U: | 2.200 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **BU:** | **3.000** | **-** |

**15.38.4. Ferðslutrygd**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.4.01. Akstovan (Rakstrarj.) | U: | -1.250 | - |
| | **BU:** | **425** | **-** |
| 38.4.02. Akstovan (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |

# § 20. Inntøkur

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -125.100 | - | 125.100 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| **20.52.1. Skattainntøkur** | | | |
| 52.1.09. Tilfeingis/loyvisskattur | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **13.000** |
| **20.52.2. Avgjøld og tollur** | | | |
| 52.2.04. Tollavgjøld | U: | - | 31.000 |
| | **BU:** | **-** | **3.000** |
| 52.2.07. Punktgjøld | U: | - | 193.000 |
| | **BU:** | **-** | **-13.000** |
| 52.2.15. Avgjald á fiskatilfeingi | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **107.000** |
| 52.2.19. Skrásetingargjald | U: | 6.000 | 91.000 |
| | **BU:** | **-** | **10.000** |
| 52.2.25. Ferðaavgjald | U: | - | 16.000 |
| | **BU:** | **-** | **-3.000** |
| **20.54.1. Heildarveiting o.t.** | | | |
| 54.1.01. Heildarveiting o.t. | U: | - | 624.100 |
| | **BU:** | **-** | **8.100** |

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Kristina Háfoss, Aksel V. Johannesen og Eyðgunn Samuelsen) tekur ikki undir við fíggjarlógaruppskotinum fyri 2013, við hesum viðmerkingum:

Samgongan fremur grundleggjandi skeivan fíggjar- og búskaparpolitikk.

Sum heild manglar eitt yvirskipað mál fyri okkara land, og síggjast ongar visjónir ella bjartar ætlanir í fíggjarlógini hjá samgonguni fyri 2013.

Hvat verður gjørt fyri at gera Føroyar til eitt betri land fyri allar føroyingar?

Tað, sum er enn meira alarmerandi, er, at heldur enn at møta teimum høvuðsavbjóðingum, ið samfelagið hevur, so verður framdur politikkur, ið ger trupulleikarnar størri.

Samgongan skapar misálit og ótryggleika
Vanliga privata nýtslan hevur sjáldan verið lægri enn nú. Hetta er eitt greitt tekin um, at fólk kenna seg ótrygg um nútíð og framtíð.

Verður hugt at, hvussu nógv fólk brúka av teirra inntøku, hevur parturin vanliga verið um 95% í Føroyum. Landsbanki Føroya metir, at nýtslukvotan var 86% í 2011 og er farin heilt niður á umleið 84% í 2012. Hetta er vanliga eitt greitt tekin um, at búskapurin er í einum lágkonjukturi, og er tað her, at høvuðsorsøkin til hallið hjá landskassanum skal finnast.

Minkandi nýtslukvotan í 2012 er grundað á, at tøka inntøkan er vaksin úr 8,7 upp í 9,1 mia. – tvs. 4,6% - í 2012, samstundis sum MVG-inntøkurnar fyrstu 11 mánaðirnar í 2012 bert eru vaksnar úr 1.126 í 2011 upp í 1.166 mió. kr. – samsvarandi við ein vøkstur á 3,6%.

Staðfestast kann tí, at vøksturin er lítil í MVG, og lutfalsliga er talan um eina minking, tí tøka inntøkan hjá føroyingum er vaksin við 4,6%, meðan MVG inntøkan fyrstu 11 mánaðirnar bert veksur við 3,6%. Føroyingar brúka sostatt minni part av tøku inntøkuni í 2012 enn í 2011.

Tøka inntøkan hjá føroyingum verður mett at vera umleið 9,1 mia. kr. í 2012. Varð nýtslan vanlig – tvs. at fólk brúktu umleið 95% av tøku inntøkuni – hevði privata nýtslan verið umleið 8,645 mia. kr. Men so er ikki í 2012. Tí við nýtlsukvotu á umleið 84% fer privata nýtslan bert at vera umleið 7,644 mia. kr. í 2012. Tvs. ein munur á 1.001 mió. kr.

Tá umleið 30% av privatu nýtsluni kemur inn sum inntøkur til landið, høvdu landsins inntøkur verið øktar við 300,3 mió. kr., um bert privata nýtslan kom upp á eitt vanligt ella meðal støði í 2012.

Sostatt hevði greitt yvirskot verið á landsins fíggjalóg, um vit bert høvdu eina leiðslu í landinum, ið megnaði at skapa álit og tryggleika í staðin fyri misálit og ótta fyri framtíðini. Tí varð rætti politikkurin førdur, so høvdu føroysku húsarhaldini aftur torað at hækkað íløgurnar og økt nýtsluna til eitt meira vanligt støði.

Hvat ger samgongan?
Í staðin fyri at skapa álitsvekjandi politikk og ein politikk, ið stimbrar búskapin, fremur samgongan stórar sparingar – eitt nú við ikki at geva lønarframskrivingar til almennar stovnar - sum skapa ótta og ótryggleika hjá nógvum húsarhaldum. Hetta hevur við sær, at nýtslan er søguliga lág og harvið lægri inntøkur til landskassan.

Eisini velur samgongan at avtaka grundleggjandi stovnar – so sum Landsbanki Føroya – hetta hóast ikki ein króna verður spard. Tvørturímóti verða útreiðslurnar størri.

Hartil verða teir bólkar, ið eru ringast fyri – eitt nú fyristíðarpensjónistar – skerdir munandi. Alt dømi um óskiljandi raðfestingar í fíggjarlógini hjá samgonguni.

Tað stendur púra greitt, at alheims fíggjarkreppan verður misbrúkt av samgonguni sum politiskt amboð fyri at fremja politiskar ætlanir um minimalstat og niðurlaðing av grundleggjandi vælferðartænastum og tjóðarstovnum. Óneyðug átøk, ið skapa eina kreppulíknandi støðu.

Minnilutin mælir til sum skjótast at broyta henda politikkin. Mælt verður heldur til, at skapa:
- ein álitsvekjandi politikk,
- at lata almennum stovnum játtan til lønarvøkstur – samanlagt 19,79 mió. kr., harav ein stórur partur kemur inn aftur sum avleiddar inntøkur hjá landinum,

- at stimbra útbúgvingar- og mentanarøkið,
- at fremja átøk, ið minka um ójavnan í samfelagnum og rætta teimum, ið hava tørv á hesum, eina hjálpandi hond, og
- at umleggja skattalættan, soleiðis at hesin eisini kemur lág- og meðalløntum til góðar. Tað er grundleggjandi abc í búskaparfrøði, at ein skattalætti til samfelagsbólkar, sum hava ríkiligt frammanundan, ikki stimbrar búskapin nakað av týdningi. Ein skattalætti til meðal- og lægri inntøkurnar fer har aftur ímóti at stimbra búskapin og økja um nýtsluna. Andstøðan mælir til, at skattalættin verður vendur á høvdið. Hetta fer at minka um ójavnan og stimbra búskapin. Við hesum politikkinum – og broytingaruppskotinum til fíggjarlógina – fer álitið og tryggleikin í samfelagnum at vaksa, og privata nýtslan fer at vaksa aftur. Hóast vit enn eru langt frá eini nýtslukvotu á 95%, so metir minnilutin varliga, at nýtslukvotan – við politikkinum hjá minnilutanum – fer at kunna økjast við umleið trimum prosentum meira enn mett í fíggjarlógini fyri 2013.

Um vit eru sera varin í framrokningini og siga, at tøka inntøkan í 2013 – sum útgangsstøði er tann sama í 2012 – meta vit, at parturin av tøku inntøkuni hjá føroyingum, ið fer í umfar í samfelagnum, fer at økjast. Við umlegging av skattalætta, játtan til lønarvøkstur og álitisskapandi politikki verður varliga mett, at nýtslukvotan fer at hækka við 3% stig í mun til fíggjarlógaruppskotið hjá samgonguni.  Tá 30% av hesi øktu nýtslu kemur sum inntøka til landið umvegis avgjøld og skatt, verður hetta ein útroknað og mett meirinntøka til landið á 81,9 mió. kr.

<u>Nú má broyting til !</u>
Vit eiga at gera átøk, ið møta teimum avbjóðingum, ið okkara samfelag hevur og styrkir um okkara búskap, men tað øvugta verður gjørt.

<u>Undirgravað landsskattainntøkurnar við yvir 300 mió. kr.</u>
Vit hava tørv á einum tryggum og støðugum búskapi, men samgongan hevur í staðin valt bæði at minka nútíðarinntøkurnar umframt at brúka av framtíðar inntøkum.

Flatskattalættin hevur bara higartil í ár minkað landsskattin við 250 mió. kr. Hetta hóast ávísan lønarvøkstur. Hevði skattaskipanin verið tann sama sum í fjør, vóru landsskattainntøkurnar um 310 mió. kr. fleiri bara higartil í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Tá árið verður liðugt er veruligi kostnaðurin av flatskattalættanum væntandi um 340 mió. kr.
Hetta er alt annað er ábyrgdarfullur politikkur. Tí verða skattalættar latnir, skulu nýggjar inntøkur sjálvandi setast í staðin fyri tær inntøkur, ið verða tiknar burtur. Tað hevur samgongan ikki tryggjað.
Samstundis hevur flatskattalættin ikki skapt vøkstur í samfelagnum. Varð skattalættin hinvegin umskipaður og gjørdur soleiðis, at hesin serliga kom teimum við lág- og miðalinntøkum til góðar, samstundis sum barnafrádrátturin varð øktur, serliga til stakar uppihaldarar, hevði hesin skapt munandi størri vøkstur og framgongd.

<u>Brenna av framtíðar pensjónsskattainntøkur</u>
Heldur enn at fáa til vega veruliga fígging av skattalættanum, hevur samgongan valt at framskunda framtíðar pensjónsskattainntøkur. Komandi pensjónistar skulu sostatt ongan skatt rinda. Skatturin verður rindaður nú og brúktur nú. Tá vit samstundis fara úr 4 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist niður í 3 longu í 2020 og 2 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist í 2040, so verða ómetaliga fá at rinda skatt, og nógv, ið skulu móttaka vælferðartænastur. Hetta kemur at merkja, at pensjónistar koma at rinda dupultan skatt og/ella høg brúkaragjøld seinni.
Samgongan velur at brúka hesar pengar nú, uttan at taka atlit til, at peningurin kemur at mangla seinni. Um 210 mió. kr. í framskundaðum pensjónsskatti verða brúktar bert í 2012. Talan er

samstundis um minst 100 mió. kr. minni enn mistu landsskattainntøkurnar.

Skapt søguliga stóran ójavna millum láglønt og hálønt
Við broytingini í pensjónsskattingini varð farið úr 35% upp í 40% skatt av kapitalpensjónum, samstundis sum luta- og lívrentupensjónir fóru frá at verða skattaðar sum A-inntøka til at verða skattaðar við 40% frá fyrstu krónu. Harvið fingu nærum allir føroyingar eina stóra pensjónsskattarokning. Serliga tey, ið høvdu lægru pensjónirnar. Samstundis varð flatskattalætti latin til tey, ið høvdu inntøkur á 250.000 kr. og hægri. Serliga hægru inntøkurnar fingu ovurstóran lætta. Heilt upp í 7.000 kr. um mánaðan.Lægru inntøkurnar fingu hinvegin bert pensjónsskattarokning.

Gjøldini til Heilsutrygd og ALS eru samstundis hækkað fyri øll, og prísvøkstur hevur verið á um 2,4%. Saman við hækkingini av pensjónsskattinum, og at lønir ov veitingar eru hækkaðar munandi minni enn prísvøksturin í samfelagnum, stendur eftir, at realinntøkan hjá føroyingum við inntøkum undir umleið 300.000 kr. er minkað munandi, meðan  hægru inntøkurnar hava fingið munandi hægri realløn.
Samgongan hevur skorið útgjaldið úr ALS við upp til 2.500 krónum mánaðarliga. Samstundis velur samgongan at skerja fyritíðarpensjónistarnar við 10 mió. kr. og at fremja átøk, ið raka tey, ið hava minst, mest.

Greitt er sostatt, at meðan tey við høgum inntøkum hava ráð at spara upp – uppsparingin veksur – so hava tey lægst løntu fingið eyka byrðar ígjøgnum príshækkingar, ongan skattalætta og hækkaðan pensjónsskatt. At hundraðtals føroyskar familjur á jólum mugu dúva upp á eina hjálpandi hond frá “Í menniskjum góður tokki” og vælgerð frá familju og vinum annars, sýnir greitt, at vit hava eina stóra fjøld av børnum og vaksnum, sum liva á einum fátækramarki, ið ikki átti at verið góðtikið í okkara ríka samfelag.

Ongantíð áður er gjógvin millum láglønt og hálønt víðkað so nógv sum seinasta árið, og tað í sær sjálvum er alarmerandi.

Økja arbeiðsloysið
Vit hava fólkaminking og ov stórt arbeiðsloysi, men heldur enn at loysa hesa avbjóðing, so biður samgongan allar almennar stovnar fækka starvsfólkatalið.

Hægri útbúgving, gransking og mentan niðurraðfest
Vit hava nógvan ungdóm, ið hevði valt Føroyar sum heimland, um møguleiki var fyri at lesa og/ella granska í Føroyum. Men heldur enn at gera hetta møguligt, so fer samgongan at skerja játtanina til verandi virksemi á Fróðskaparsetri Føroya, og verður játtan til ES-gransking skorin burtur. Eisini er tað avgerandi fyri okkara trivnað og menning at hava eitt livandi og ríkt mentanarlív. Men samgongan velur at skerja Mentanargrunnin fram um alt annað, eins og søvnini og onnur øki innan mentan eisini verða skerd munandi.

Ongar nýskipanir
Vit hava ovurstóran tørv á nýskipanum innan okkara fiskivinnu og okkara samfelag sum heild. Heldur enn at koma við greiðum boðum upp á nýskipanir, verður sett ”politikarar-ásett” tilfeingisgjald á fiski- og alivinnuna.
Vit hava tørv á nýskipan millum land og kommunur, men í staðin varð fólkaatkvøða framd á so ringum grundarlagi, at endamálið tyktist at fáa eitt rungandi nei á fólkaatkvøðuni. Samstundis er eingin nýskipan at hóma innan skúlar ella heilsuverkið.
Vit hava hartil stórar avbjóðingar á orkuøkinum í dag og verða hesar størri komandi árini. Heldur ikki her kemur samgongan við nøkrum uppskotum til loysn.

Størri spjaðing millum útjaðara og miðstað
Vit hava tørv á menning kring allar Føroyar, men heldur enn at gera nakað fyri at fáa hesa, minkar samgongan um túratalið til og úr Suðuroynni. Ongar ætlanir verða lagdar fyri betri ferðasambandi til suðurpartin av Føroyum, eins og einki verður gjørt við eitt nú nýggjan eftirskúla í Suðuroynni ella á Sandoynni, ið kundi skapt framburð og menning.

Alternativa fíggjarlóg
Fíggjarlógin átti sjálvandi at verið grundað á eina visjón fyri okkara land og viðgjørt yvirskipaðu samfelags málini og avbjóðingarnar, umframt komið við boðum upp á ítøkilig átøk fyri at møta teimum avbjóðingum, ið okkara samfelag hevur, sum best.

Í staðin er samgongan komin við eini fíggjarlóg, ið minnir um eitt bókhald, har einasta málið er, at botnlinjan skal geva 0 í 2016, kryddrað við nøkrum átøkum, ið skapa óneyðugan hvøkk og ótryggleika – og niðurlaðing av týðandi samfelagsstovni.

Ikki eitt orð um, hvørjar Føroyar vit skulu hava um 1 ár , 5 ár og 10 ár, og hvørji átøk vit velja at fremja fyri at røkka teimum Føroyum, ið vit ynskja. Tíverri.

Føroyingar hava uppiborið betur – vit skulu velja aðra kós
Minnilutin vil tryggja føroyingum einar Føroyar í 2013 og komandi árini, við størri samhaldsfesti, trivnaði, sterkum búskapi og fólkavøkstri. Einar Føroyar sum stíla fram ímóti fylgjandi 5 málum:

1. Eitt samhaldsfast samfelag fyri allar føroyingar.
2. Einar sjálvbjargnar og sjálvberandi Føroyar.
3. Útbúgving og mentan sum drívmegi fyri framgongd.
4. Vakstrarskapandi nýskipanir.
5. Menning kring allar Føroyar.

Fyri at røkka hesum málum skulu ein røð av málrættaðum átøkum setast í verk komandi árini.

Nakrar av broytingunum, ið broytingaruppskotinum til fíggjarlógaruppskotið frá samgonguni, skulu verða nevndar her:

1. Eitt samhaldsfast samfelag fyri allar føroyingar

Frá flatskattalætta til samhaldsfasta skattaskipan
Flatskattalættin verður umskipaður, soleiðis at hesin verður ein skattalætti, ið vendir sosialt rætt, og allir føroyingar fáa gagn av. Barnafrádrátturin skal økjast – serliga fyri stakar uppihaldarar Rættast hevði verið at latið skattalættan yvir 3-4 ár, men nú, lættin er samtyktur, verður hesin ikki minkaður í 2013 í hesum broytingaruppskoti frá minnilutanum.

Fyritíðarpensjónin skal ikki skerjast.
Hetta merkir, at Almannamálaráðið fær 10 mió. kr. eyka í mun til uppskotið frá samgonguni.

Skúlatilboð eftir fólkaskúlan skal ikki bert vera fyri nøkur børn og ung í Føroyum.
Børn og ung við serligum avbjóðingum skulu eisini fáa bjóðað miðnámsútbúgving eftir fólkaskúlan. Settar verða av 3 mió. kr. til íverksetan av hesum, umframt at taka fleiri inn á Rásina.

Barnaumboð skal setast í verk sum partur av Løgtingsins Umboðsmanni. Hetta fyri at tryggja og verja rættindini hjá okkara børnum.

Heilsutrygdargjaldið verður rindað umvegis skattaskipanina frameftir. Hetta sparir nógv fyrisitingarliga og skal hartil tryggja, at heilsutrygdargjaldið verður meira progressivt enn í dag. Tey, ið ikki rinda skatt í Føroyum, rinda heilsutrygdargjaldið eins og onnur líknandi gjøld – t.d. ALS-gjaldið.

Tannheilsutænasta
Verður tøk til tey, ið av fíggjarligum orsøkum ikki hava ráð til at venda sær til vanligan tannlækna.

2. <u>Einar sjálvbjargnar og sjálvberandi Føroyar</u>

Búskaparligt sjálvbjargni verður raðfest høgt.
Andstøðan leggur upp til eitt munandi minni hall enn samgongan. Meðan fíggjalógaruppskotið frá samgonguni væntar eitt hall á 253 mió. kr., verður úrslitið hjá minnilutanum eitt hall á 149 mió. kr.
Ríkisveitingin verður ikki hækkað, so sum samgongan ynskir.

Ábyrgd av egnari fyrisiting verður uppraðfest.
Loftrúmið verður yvirtikið. Hetta merkir í 2013 eina meirútreiðslu á 500.000 kr. hjá Løgmansskrivstovuni, men fer vegna økt virksemi í landinum, sum frá líður, at geva fleiri inntøkur komandi árini.

Heimtøka av ábyrgdini á fleiri økjum
Ábyrgdin av útlendingaøkinum verður heimtikin, og arbeitt verður við at nágreina, hvat skal til, fyri at yvirtaka familju- og arvarættarliga og fíggjarøkið.
Samgongan ætlar at skerja Kirkjugrunnin í 2014. Minnilutin vísir á, at í sambandi við, at kirkjan varð yvirtikin sum føroyskt málsøki, varð semja gjørd við kirkjuliga landslagið um ikki at skerja játtanina. Henda semja eigur at verða vird.
Hartil verður mælt til at søkja um føroyskan WTO limaskap, tí hesin gevur Føroyum neyðugu amboðini til at røkja áhugamál Føroya – eitt nú í makrelmálinum.

<u>Landsbanki Føroya verður varðveittur</u>
Landsbanki Føroya og Hagstova Føroya skulu varðveitast sum grundleggjandi stovnar við núverandi nøvnum. Landsbankin skal í enn størri mun tryggjast innlit í føroysku peningastovnarnar og skal leggja seg eftir støðugum tilráðingum og váðametingum av føroyska fíggjargeiranum í mun til føroyska samfelagið.
Møguleiki er at spara meira enn tað, ið fíggarlógaruppskotið frá samgonguni leggur upp til – uttan at avtaka Landsbanka Føroya. Tí uppskotið leggur upp til at flyta 10,3 mió. kr. – ið er júst sama upphædd, ið Landsbankin hevur nýtt til rakstur – til 4 ymsar stovnar í 2013. Samstundis verða tær 4 mió. kr., ið verða fluttar í Tiltaksgrunnin (ið landið eigur), settar inn sum «sparing». Hetta er ikki so, tí talan er um pening, ið verður settur av til grunn hjá landinum.
Í staðin verður mælt til at minka gjaldið til Landsbankan úr 1% niður í 0,75% av innistandandi, og hartil at minka tann partin, ið verður settur í Tiltaksgrunnin úr 20% av yvirskotinum niður í 10%. Hetta gevur eina samlaða sparing til landið á um 1,7 mió. kr.
Minnilutin vil harðliga ávara ímóti at niðurleggja Landsbanka Føroya sum óheftan ráðgevandi stovn. Serliga vandamikið er tað at missa einasta óhefta tjóðarbúskaparstovn okkara, ið kann veita óhefta búsakaparráðgeving við serligum atliti til fíggjargeiran. Hartil óskiljandi at niðurleggja óheftu gjaldførisumsitingina og umsitingina av AMEG og leggja hesa í stovn beint

undir landsstýrismanninum. Landsstýrisins ætlanir kunnu ávirka okkara rating, rentustøði og seta stórt trýst á landsstýrismannin um at seta gjaldførið í føroysk áhugamál, heldur enn at seta gjaldførið, har tað samfelagsbúskaparliga er skilabest. Eitt stórt afturstig uttan endamál, tí væntast má, at landsins útreiðslur gerast størri við ætlanini hjá samgonguni.

Føroyar styrkja sambandið við Bretland
Hetta fer eitt nú at kunna verða viðvirkandi til at skapa nýggj handilssambond og lækka kostnaðarstøðið í Føroyum. Men heldur enn at knýta nærri bond hevur løgmaður fráboðað, at ætlanin er at niðurleggja føroysku sendistovuna í London. Hetta er eitt átak, ið minnilutin ikki tekur undir við.

Føroyska sendustovu í Nuuk
Systurtjóð okkara Grønland, er vorðið snúningsásin í altjóða áhuganum fyri vinnumøguleikum í Arktis. Føroyingar og grønlendingar hava tætt sambond og langa siðvenju fyri handilsligum og mentanarligum samstarvi. Vit eiga tí at virka fyri og kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn føroyska sendistovu í Nuuk til tess at útbyggja sambondini, ikki minst tey týðandi vinnuligu sambondini, við Grønland. Játtan er sett av til endamálið.

Pensjónsskattur spardur upp í Búskapargrunni Føroya
Samgongan valdi at fara undir at skatta pensjónir við inngjald pr. 1. januar 2012. Samstundis verða allar pensjónir, ið eru uppspardar fram til 31. desember 2011 skattaðar við útgjaldi nú og frameftir. Sostatt hevur landskassin nú inntøkur bæði frá skatti av pensjónsinngjaldi og –útgjaldi. Hetta fer at verða galdandi nøkur ár fram, og gevur eina óvanliga dupult-inntøku í eitt tíðarskeið. Stórur vandi er fyri, at landið velur ikki at fremja neyðugu nýskipanirnar í samfelagnum í hesi fyribilsstøðu.
Seinni fer bert skattur at koma frá pensjónsinngjaldi frá teimum, sum eru á arbeiðsmarknaðinum. Vit vita, at tað gerast støðugt fleiri eldri og færri á arbeiðsmarknaðinum, í dag eru um 4 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist, men framskrivingar vísa, at longu í 2020 eru bert 3 og í 2040 bert 2 á arbeiðsmarknaðinum fyri hvønn pensjónist. Nú skatturin er umlagdur frá skatting av pensjónsútgjaldi til inngjald, fara allir pensjónistar í framtíðini ikki at rinda skatt. Samstundis fer tørvurin á eldratænastum at økjast. Hetta má leggjast upp fyri.

Minnilutin mælir til, at inntøkurnar frá skatting av pensjónsinngjaldi verða fluttar í Búskapargrunn Føroya, so hesar **inntøkur**, ið eru framskundaðar framtíðar skattainntøkur, verða tøkar í framtíðini. Hetta merkir, at 230 mió. kr. í pensjónsskatti verða fluttar í Búskapargrunn Føroya í 2013.

Búskapargrunnur Føroya hevur m.a. til endamáls at tálma sveiggjum í føroyska búskapinum og at tryggja samfelagnum og landskassanum gott lánføri. Ásetingarnar í Búskapargrunni Føroya eiga at verða dagførdar soleiðis, at grunnurin í enn størri mun kann virka sum eitt konjukturútjavnandi amboð. Hetta soleiðis at møguleiki eitt nú verður fyri at nýta part av innstandandi til at rinda skuld við í niðurgangstíðum.

3. Útbúgving og mentan sum drívmegi fyri framgongd

Hægri útbúgving verður uppraðfest.
Fróðskaparsetur Føroya fær økta játtan. 5 mió. kr verða settar eyka av, so farast kann undir at skipa fleiri útbúgvingar umvegis fjarlestrarskipanir at taka fleiri inn á verandi útbúgvingar og at stovna fleiri útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum.

Granskingarøkið skal mennast
Samgongan hevur valt at taka Føroyar úr ES-granskingarsamstarvinum í 2014 og á henda hátt ”spara” 9,7 mió. kr. Hetta er tó sparing, ið minnilutin metir fer at verða ein stór nettoútreiðsla, tí vit missa vitan, førleikar og ikki minst fólk av landinum. Tí skulu Føroyar framhaldandi vera við í hesum samstarvi.
Eisini eiga Føroyar at raðfesta at gera Føroyar sum íleguland, har verkætlanin FarGen kann gerast avgerandi fyri, um hetta eydnast. Settar verða av 400.000 kr. at seta ferð á verkætlanina.

Føroyskur eftirskúli skal skipast
Fleiri enn 80 ung í Føroyum fara í hvørjum ári av landinum á eftirskúlar. Fleiri av hesum venda ikki aftur. Vit skulu seta á stovn føroyskan eftirskúla, ið kann bjóða føroyingum í og uttan fyri Føroyar nýskapandi eftirskúlatilboð. Sett er av 500.000 kr. til at fyrireika verkætlanina, samstundis sum 3 mió. kr. verða settar av á íløgusíðuni til at tillaga ein verandi bygning, so farast kann undir skúlatilboðið í 2014.

Hjálparfólkaútbúgving sett í verk
Hjálparfólk á dagstovnum v.m. skulu hava møguleika at nema sær eina útbúgving í Føroyum. Fyrireikingar eru gjørdar, og eftir er at seta hesa í verk. Minnilutin setir neyðuga játtan av til hesa.

Mentanarøkið skal styrkjast
Tí uttan eina livandi og sterka mentan verða Føroyar ikki landið, har okkara ungu velja at búsetast og skapa í framtíðini. Tí verða 5 mió. kr. settar av til at fara undir prosjektering av nýggjum Tjóðleikhúsi. Samgongan velur at steðga hesi ætlan.
Eisini verða 1,5 mió. kr. settar av til Mentanargrunnin, og Føroya Symfoniorkestur fær meirjáttan á 300.000 kr. og Musikkskúlin 500.000 kr. afturat.
Samgongan sker annars eisini ymsar játtanir serliga á mentanarøkinum hjá Mentamálaráðnum – eitt nú søvnini. Hetta er ein skerjing, ið rakar hart, og eigur ikki at verða framd.
3,3 mió. kr. verða settar av til at styrkja mentanarøkið við, við hesum broytingaruppskoti.
Kringvarp Føroya má tryggjast ein støðugan rakstur, har inntøkurnar samsvara við public service skyldurnar. Kringvarpsgjaldið skal leggjast um. Útvarpið skal ikki vera í kapping við privatu miðlarnar um handilslýsingar, meðan lýsingarinntøkur frá sjónvarpinum fara í Miðlagrunnin. Allir fjølmiðlar kunnu síðan søkja úr grunninum, m.a. til stuðul til blaðútbering, fyri at tryggja eitt fjøltáttað úrval av fjølmiðlum í Føroyum.

Alneyðug tilboð til børn og ung við serligum avbjóðingum skipað
Á hvørjum ári fara tíggjutals børn og ung av landinum – ofta saman við allari familjuni – tí vit ikki kunnu bjóða nøktandi tilboð til teirra í Føroyum. Hetta er ikki nøktandi. Heimtøka av tilboðum til føroysk børn og ung við serligum avbjóðingum verður framd í verki. Í dag verða 43 mió. kr. sendar av landinum saman við børnum og ungum hvørt ár. Hesin peningur hevði rokkið langt í Føroyum og hevði skapt virksemi, størv og vøkstur í Føroyum, um rætt varð borið at. Sett verður av 1 mió. kr. fyri at fáa skipaða tilgongd at seta á stovn tilboð, har hetta kann gerast við fyrimuni í Føroyum. Eisini verður 1,5 mió. kr. settar av til at fáa burtur bíðilistar til umlætting og stuðlar, eins og 2,5 mió. kr. verða settar av til miðnámsskúlatilboð til føroyingar við serligum avbjóðingum.

Havrannsóknarskip og Magnus Heinason
Neyðugt er at raðfesta hetta økið. Minnilutin mælir til at seta 1,5 mió. kr. av til bráðfeingis viðlíkahald av Magnusi Heinasyni. Hetta er neyðugt, fyri at klassin skal góðkenna skipið, og at hetta sleppur út at gera kanningar. Hartil verður mælt til at seta munandi upphædd av til íløgu í nýtt havrannsóknarskip.

4. Vakstrarskapandi nýskipanir

Ein verulig fiskivinnunýskipan skal fremjast
Ein fiskivinnunýskipan, ið tryggjar okkara høvuðsvinnu góðar og tryggar karmar at virka innan, er størsta einstaka átakið, ið kann skapa vøkstur aftur í Føroyum. Neyðugt er við breiðari semju um nýskipanina soleiðis, at talan verður um eina skipan, ið verður verandi komandi nógvu árini. Andstøðan bjóðar samgonguni, at samgonga og andstøða saman arbeiða við eini fiskivinnu-nýskipan, og vónandi verður tikið av hesum.

Tað er greitt, at ein stór tilfeingisrenta hevur verið í føroysku fiskivinnuni sum heild. Hetta er tann eykavinningurin, sum er, tá vunnið verður burur úr einum náttúrutilfeingi, tá allar útreiðsur og vanligur vinningur eru drigin frá. Seinastu árini er hendan tilfeingisrentan tikin út úr vinnuni og er farin beinleiðis til privat feløg og einstaklingar, tá skip við fiskiloyvum eru keypt og seld fyri ovurstórar upphæddir. Hetta var ongantíð ætlanin við lógini um vinnuligan fiskiskap. Hinvegin varð sagt, tá hon varð samtykt fyrstu ferð, at tilfeingisrentan skuldi koma aftur til eigaran av tilfeinginum, Føroya fólk, umvegis landskassan

Í løtuni verður arbeitt við eini nýskipan fyri fiskivinnuna, har høvi er at tryggja eina slíka skipan, har tilfeingisrentan kemur í landskassan. Tað eigur sjálvandi bara at vera landið, ið kann bjóða út fiskirættindi í ávís tíðarskeið fyri gjald – og ikki tey, ið hava fingið ein brúksrætt fyri einki. Andstøðan metir, at uttan mun til, hvør loysn verður vald, so eigur ein nýskipan at geva minst 195 mió. í 2013.

Gjaldið eigur ongantíð at verða tikið av óbýttum, tí tá verður gjaldið lagt á fiskimannin. Hartil verður mett skilabesta at halda útróðrarflotan uttan fyri skipan við tilfeingisgjaldi.

Fiskiveiðieftirlitið skal styrkjast
Samgongan hevur valt at niðurraðfesta Fiskiveiðieftirlitið. Minnilutin mælir til at seta nakrar mió. kr. av til at styrkja trygdina og eftirlitið á sjónum. Hetta er týðandi virksemi fyri okkara høvuðsvinnu, og tað er alneyðugt, at bæði skipini hava orku til at fremja teirra virksemi. Greið mál eiga at verða sett fyri okkara fiskiveiðieftirlit, og síðan eiga skipini at fáa atgongd til ta olju, ið tørvur er á – evt. umvegis serstaka oljukonto.

Nýskipanir innan fyrisiting, skúlar og heilsuverk
Eftir alt ov fáar nýskipanir í áratíggir, krevja skúla-, almanna- og heilsuverkið somuleiðis nýskipan og betri samskipan, eins og almenna fyrisitingin eigur at verða skipað av nýggjum, soleiðis at brúkarin støðugt er í miðdeplinum, og allar óneyðugar dupultfunktiónir fella burtur. Heldur enn at fremja veruligar nýskipanir ætlar samgongan at fremja "plenuklippara" sparingar í fólkaskúlanum, heilsuverkinum og øllum tí almenna geiranum.
Minnilutin mælir til at lata verandi almennum stovnum alneyðuga játtan til lønarvøkstur, og heldur fara undir at fremja veruligar nýskipanir, ið koma øllum føroyingum til góðar. Hetta broytingaruppskot leggur upp til, at møguligur fíggjarligur vinningur við betri samskipan eitt nú í fólkaskúlanum verður latin aftur til menning av okkara útbúgvingum og skúlum.

Fjøltáttað útboð av bústøðum
Bústaðarøkið eigur at verða nýskipað, og Bústaðir (fyrrverandi Húsalánsgrunnurin) eigur at verða virkin leikari fyri at skapa eitt meira fjøltáttað bústaðarútboð í Føroyum – bæði fyri lesandi, støk, eldri og føroyingar við serligum avbjóðingum. Hetta er ein týðandi liður fyri aftur at skapa trivnað og fólkavøkstur í Føroyum.

Føroyar gerast førandi innan grøna orku
Orkuavbjóðingin er millum heilt stóru avbjóðingarnar í føroyska samfelagnum nú og frameftir. Hetta er ein avbjóðing, ið má møtast soleiðis, at vit fáa so umhvørvisvinarliga, grøna og varandi orku sum møguligt. Hetta broytingaruppskot leggur upp til, at játtan verður latin til Orkugrunn, ið skal stuðla grønum orkuverkætlanum kring landið. Hetta eru tó verkætlanir, ið krevja munandi fígging, so neyðugt verður við munandi uppraðfesting av hesum øki komandi árini.
Nú Føroyar hava gjørt avtalu við íslendingar um at kanna møguleikarnar fyri el-kaðali millum londini bæði, eigur dentur at verða lagdur á at fáa Føroyar við í samstarvið millum bretar og íslendingar um kaðal niður á bretska meginlandið. Ein íbinding í evropiska el-netið, hevði stabiliserað okkara el-net, so vit sjálvi kunnu framleiða munandi størri mongdir av ójavnari orku (vindorku, sjóvarfalsorku v.m), samstundis sum vit fingu møguleikan bæði at keypa og selja orku gjøgnum evropiska el-marknaðin. Samstundis er sera ómetaliga umráðandi, at vit halda fram at menna okkara egnu varandi orkukeldur við tí endamáli at gerast sjálvveitandi við grønari orku.

Ferðavinnan ein sera týðandi vinna fyri framman
Eisini mælir minnilutin staðiliga til, at Vinnumálaráðið ger alt fyri at stuðla nýggja Ferðaráðnum og at nýta tíð og orku til at fáa føroysku ferðavinnuna samskipaða og menta til enn eina høvuðsvinnu í Føroyum. Minnilutin mælir til at lækka ferðaavgjaldið, og eru settar av 3 mió. kr. til hetta endamál.

Barsilsskipanin støðugt mennast
Málið er, at geva møguleika til 1 árs barsilsfarloyvi við løn, og verður barsilstíðin longd, eftirlønargevandi og meira flexibul samsvarandi uppskoti, ið er lagt fyri Løgtingið. So hvørt rúm verður fyri hesum, verður barsilstíðin longd, til hon røkkur einum ári. Hetta er ein av mongum liðum í at økja trivnað og skapa fólkavøkstur. Í 2013 eru mettar 5 mió. kr. tøkar til at betra skipanina uttan at økja inngjaldið.

5. Menning kring allar Føroyar

Vit skulu tryggja menning kring allar Føroyar, og fyritreytin fyri hesum eru góð samferðslu-viðurskifti. Samgongan velur at gera tað øvugta, nevnliga bæði at steðga øllum forkanningum við framtíðar Sandoyartunli og at skerja túratalið til og úr Suðuroynni. Hesum tekur minnilutin ikki undir við.

Túratalið til Suðuroyar varðveitt og ferðaseðlaprísir javnsettir
Hetta broytingaruppskot veitir Strandfaraskipum Landsins 2,8 mió. kr. eyka, so túratalið til og úr Suðuroynni verður varðveitt. Hartil verða settar av 4 mió. kr. afturat til SSL fyri at fara undir tilgongd at javnseta ferðaseðlakostnaðin við skipunum og undirsjóvartunlunum.
Serliga eigur dentur at verða lagdur á at tryggja teimum, ið hava bústað í Suðuroynni, Sandoynni og á útoyggjum, lægri ferðaseðlakostnað enn í dag.

Nólsoyarferja og skúvoyarferja
Játtan er sett av til at fara undir nýggja nólsoyarferju. Minnilutin setir hartil játtan av til at fara undir at tryggja eina góða samferðsluloysn fyri Skúvoynna.

Forkanningar til Sandoyartunnil gerast lidnar
Hartil leggur hetta broytingaruppskot upp til at taka undir við tilmælinum frá Rættarnevnd Løgtingsins um at gera seinasta partin av kjarnuboringum lidnar, soleiðis at forkanningar fyriliggja viðvíkjandi einum komandi sandoyartunli. Undanfarin ár eru nýttar nógvar mió. kr.,

men enn manglar seinasti parturin. Við 7 mió. kr. afturat kunnu forkanningarnar gerast lidnar. Hetta gevur betri grundarlag fyri at meta um, hvat skal til fyri at gera ein sandoyartunnil.

Smærri tunnilsverkætlanir kring allar Føroyar
Eisini verður í hesum broytingaruppskoti lagt upp til, at 5 mió. kr. verða settar av til keyp av útgerð til at kunna gera smærri tunnilsverkætlanir kring landið. Nógvar smærri bygdir kring landið hava vegaføring, ið skal dagførast í nærmastu framtíð – eitt nú Dalur, Fámjin, Tjørnuvík v.m. Ein máti at gera hetta kann verða, at Landsverk fær tunnilsútgerð og setir saman tunnilstoymi, ið kann arbeiða við hesi útgerð til smærri tunnilsverkætlanir kring landið yvir eitt áramál. Harvið fáa ein røð av støðum dagførda, trygga og nútíðarhóskandi vegaføringar til ein sámuligan kostnað. Eitt nú til Dals, Fámjins, Tjørnuvíkar, Gjáar v.m. Útgerðin kann keypast í 2013, og síðan kann tunnilstoymið arbeiða við hesum verkætlanum kring landið komandi árini.

Føroyskur eftirskúli skipast
Eftirskúlin, ið eisini varð umrøddur omanfyri, fer at kunnu skapa framburð og menning, har hesin verður – uttan mun til um hetta verður í Suðuroynni ella Sandoynni. Føroyar hava alt at vinna og einki at tapa við at seta ferð á hesa týðandi verkætlan, og verður tí eisini settar av 3,6 mió. kr. í hesum broytingaruppskoti fyri at fáa gjørt seinastu fyrireikingarnar, soleiðis at eftirskúlin kann gerast veruleiki í 2014.

Tryggur sjúkraflutningur
Samgongan hevur skorið burtur ta sjúkrafarleið, ið sandoyingar higartil hava havt um Skopunarfjørð við skipi. Eftir er bert tyrla, ið sum kunnugt ikki fær flogið í ringum veðri. Minnilutin setir neyðuga játtan av til, at sandoyingar eisini frameftir hava trygga sjúkraflutningsfarleið um Skopunarfjørð.

Minnilutauppskotið inniheldur umframt tað, ið er nevnt her, eina røð av betringum í mun til fíggjarlógaruppskotið frá samgonguni.

Samanumtikið má staðfestast, at:

Samgongan byggir sín fíggjarpolitikk á at tekna eina dapra kreppumynd av føroyska búskapinum og møguleikunum. Og við at tekna døpur útlit og stór hall, nýtir samgongan sína egnu mynd sum grundgeving fyri at fremja niðurskurðir, sparingar og umfordeilingar, sum bert gera trupulleikarnar størri. Og sum elva til vantandi nýskipanir, øktan ójavna og vantandi álit og trivnað fyri fjøldina í Føroyum.

Í roynd og veru rekur samgongan sama skeiva fíggjar- og búskaparpolitikk og sama skeiva vinnupolitikk, sum hevur elvt til kreppuna í vesturheiminum og í Føroyum:
Politiskar fyrimunir fyri nøkur fá, munandi øktar nýtslumøguleikar av luksusvørum til ein minni part av fólkinum, øktar byrðar á tey mongu, vantandi regluverk og atgerðir mótvegis fíggjarmarknaði og spekulasjón – og vantandi íløgur í útbúgving, gransking og mentan.

Flestu lond í vesturheiminum og stórur partur av búskaparfrøðini í heiminum– sjálvt hjá Heimsbankanum og altjóða gjaldoyragrunninum, IMF – ásanna nú, at hesin politikkurin við øktum ójavna, stórum skattalættum til hægstu inntøkurnar, óreguleraðum fíggjarmarknaði, ógvusligum sparingum í vælferðartænastum og vantandi íløgum í nýskipanir er ikki partur av loysnini, men kjarnin í trupulleikanum. Ikki bert við atliti til sosialu avleiðingarnar, men eisini tí, at hetta ikki elvir til haldgóðan búskap og vøkstur, ið kann vinna á kreppunum.

Veruleikin er, at tær sparingar og teir niðurskurðir, ið samgongan mælir til í Føroyum, økir um

kreppuna og trupulleikarnar og minkar um álitið og optimismuna, sum er neyðug í einum og hvørjum samfelag. Og hetta ger tað munandi verri at vinna á hallinum í føroyska búskapinum og hjá landskassanum.

Andstøðan á eina heilt aðra leið fyri Føroyar, og ein heilt annan politikk, sum kann skapa einar vaksandi, samhaldsfastar og sjálvbjargnar Føroyar. Ein fíggjar- og búskaparpolitikk, sum gagnar heildini og fjøldini, og sum byggir á teir ríku og fjølbroyttu møguleikar, ið vit hava í Føroyum, og sum liggja beint fyri..

Við at fylgja uppskotinum hjá andstøðuni, sæst eisini, at hallið á fíggjarlógini kann vendast til yvirskot uttan ógvusligar sparingar, niðurlaðingar og niðurskurðir.

Samanumtikið merkja broytingar frá minnilutanum, at hallið á fíggjarlógini fyri 2013 verður 149,3 í mun til 253 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum. Í hesum úrsliti er ein meting á 81,9 mió. kr., ið eru neyvt útroknaðar og varligar metingar av øktum inntøkum vegna ávísa hækking í nýtslukvotuni, ið fer at verða úrslitið av einum politikki, ið aftur skapar álit á framtíðina og setir gongd á samfelagshjólini. Hóast hesar avleiddu inntøkurnar ikki vórðu tiknar við, er hallið í broytingaruppskotinum frá minnilutanum lægri enn í fíggjarlógaruppskotinum frá landsstýrinum.

Hetta eru yvirskipaðu broytingarnar í inntøkum, rakstrarútreiðslum og íløguútreiðslum:

<u>INNTØKUR</u>

Minnilutin mælir samanlagt til broytingar, ið økja inntøkur landsins við 191,6 mió. kr. í mun til fíggjarlógaruppskotið hjá samgonguni. Í høvuðsheitum er

| | |
|---|---|
| Umleggja flatskattalætta til progressivan skattalætta | 0 |
| Inntøkur frá øktum TAKS eftirliti | 16 |
| Fiskivinnunýskipan | 75 |
| Gular nummarplátur | 5 |
| Avleiddar inntøkur frá hægri rakstri | 25,1 |
| Avleiddar inntøkur frá hægri íløgum | 12,4 |
| Avleiddar inntøkur frá øktari nýtslukvotu (3% øking) | 81,9 |
| | |
| Lækka ferðaavgjaldið | -3 |
| Taka burtur vøkstur í ríkisveiting | -8,2 |
| Rentuinntøkur úr Landsbanka | -4 |

Hartil broytingar í millumverandi millum Landsbanka Føroya, rentur o.a., ið verða tillagaðar, tí Landsbanki Føroya ikki skal avtakast.

<u>ÚTREIÐSLUR</u>

<u>ÍLØGUR</u>

Minnilutin mælir samanlagt til broytingar, ið økja íløgur landsins við 41,4 mió. kr. í mun til fíggjalógaruppskotið. Umframt tær íløgur, ið samgongan hevur, verða eitt nú hesar framdar:

5 mió. kr. til at fyrireika Tjóðleikhús,
2 mió. kr. til at fara undir at digitalisera bandasavn hjá KVF

4 mió. kr. til lestraríbúðir
3 mió. kr. til at tillaga verandi bygning til ein føroyskan eftirskúla
2 mió. kr. eyka til miðnámsskúlan á Kambsdali (peningur, ið ikki er náddur at nýta í des. 2012)
3 mió. kr. eyka til Klaksvíkar Sjúkrahús (peningur, ið ikki er náddur at nýta í des. 2012)
400.000 kr. til Dugna
5 mió. kr. til Orkugrunn, ið skal stuðla grønum orkuverkætlanum kring Føroyar,
7 mió. kr. til at byggja nýtt Havrannsóknarskip,
7 mió. kr. til at gera seinastu kjarnuboringarnar, ið skulu til fyri at meta um, hvat skal til fyri at gera ein framtíðar sandoyartunnil,
5 mió. kr. til at fyrireika hvalbiartunnil, og
5 mió. kr. til útgerð til smærri tunnilsverkætlanir.

Mælt verður til, at Skálafjarðartunnilin verður við í eini heildarætlan fyri framtíðar útbygging av almenna samferðslukervinum, heldur enn at nýta 12 mió. kr. í 2013 og 2014 til prospekt og útbjóðingartilfar, so sum samgongan ætlar.

Hartil verður  mælt til, at seta pening av til innbúgv v.m. til Marknagilsdepilin í seinasta lagi í 2015, soleiðis at hesin kann takast í nýtslu á sumri 2015.

Hetta eru allar íløgur, ið fara at skapa virksemi, trivnað og størri vøkstur.

RAKSTRARÚTREIÐSLUR

Minnilutin mælir samanlagt til broytingar, ið økja rakstrarútreiðslur landsins við undir 1,1% í 2013 í mun til 2012. Hetta er ein sera lágur vøkstur, ið er munandi lægri vøkstur enn prísvøksturin, ið er 2,4%.

Mælt verður til, at lata øllum almennum stovnum játtan til tann lønarvøkstur, ið sáttmálarnir leggja upp til, soleiðis at virksemið kann halda áfram, og stovnarnir hava tryggar umstøður at virka innan.

Samanlagt verða rakstrarútreiðslur landsins við broytingaruppskotinum 50,2 mió. hægri enn í fíggjarlógini hjá samgonguni.

Av hesum kunnu eitt nú nevnast:
19,5 mió. kr. til lønarframskrivingar hjá øllum almennum stovnum,
10 mió. kr. er til fyritíðarpensjónsøkið,
6,8 mió. kr. til Strandfaraskip Landsins,
4,6 mió. kr. til eldrarøkt og heimarøkt
5 mió. kr. til Fróðskaparsetur Føroya
2,5 mió. kr. til miðnámsskúlatilboð til føroyingar við serligum avbjóðingum
2,3 mió. kr. til Fountain Hús
1,5 mió. kr. til Mentanargrunn Føroya og 3,3 til ymsar mentanarjáttanir

Harumframt er ein røð av raðfestingum, ið skulu skapa trivnað og vøkstur kring allar Føroyar.

<u>SAMLAÐ ÚRSLIT – RLÚ 1</u>

Minnilutin mælir samanlagt til broytingar, ið gera úrslitið hjá landskassanum 100 mió. kr. betri enn fíggjarlógaruppskotið frá samgonguni.

Hallið fer sostatt niður á 153 mió. kr. við broytingaruppskotinum hjá minnilutanum.

Við hesum viðmerkingum setur minilutin fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 1. Løgtingið

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 256 | 256 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **1.10.1. Løgtingið** | | | |
| 10.1.03. Løgtingsarbeiði (Rakstrarj.) | U: | 30.165 | - |
| | **BU:** | **196** | **-** |
| **1.10.2. Stovnar knýttir at løgtinginum** | | | |
| 10.2.01. Landsgrannskoðanin (Rakstrarj.) | U: | 6.000 | - |
| | **BU:** | **40** | **-** |
| 10.2.07. Løgtingsins umboðsmaður (Rakstrarj.) | U: | 3.300 | - |
| | **BU:** | **20** | **-** |

# § 2. Løgmannsfyristiting

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -377 | -377 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **2.11.1. Fyrisiting** | | | |
| 11.1.02. Løgmansskrivstovan (Rakstrarj.) | U: | 32.450 | - |
| | **BU:** | **489** | **-** |
| **2.12.3. Landsstýrið** | | | |
| 12.3.01. Løgmaður og landsstýrið (Rakstrarj.) | U: | 6.350 | - |
| | **BU:** | **-1.866** | **-** |
| **2.13.3. Menningarhjálp** | | | |
| 13.3.04. Menningarsamstarv (Stuðulsj.) | U: | 2.000 | - |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |

# § 3. Fíggjarmál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -5.642 | -5.642 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. - Tús. | Innt. kr. - |
|---|---|---|---|
| **3.11.1. Fyrisiting** | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.03. Fíggjarmálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 9.689 | - |
| | **BU:** | **-432** | **-** |
| 11.1.36. Sáttmálaviðurskifti (Rakstrarj.) | U: | 600 | - |
| | **BU:** | **-298** | **-** |
| 11.1.99. Óheft fíggjarráðgeving (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **600** | **-** |

### 3.15.1. Fíggjafyrisiting v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.1.04. TAKS (Rakstrarj.) | U: | 68.587 | - |
| | **BU:** | **4.451** | **-** |
| 15.1.07. Føroya gjaldstova (Rakstrarj.) | U: | 31.880 | - |
| | **BU:** | **-6.546** | **-** |
| 15.1.13. Búskaparráðið (Rakstrarj.) | U: | 250 | - |
| | **BU:** | **2** | **-** |

### 3.15.2. Hagfrøði

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.2.01. Hagstova Føroya (Rakstrarj.) | U: | 11.340 | - |
| | **BU:** | **-1.712** | **-** |

### 3.18.1. Tænastumannaeftirlønir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 18.1.01. Tænastumannaeftirlønir (Lógarbundin j.) | U: | 22.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |
| 18.1.04. Læraraeftirlønir (Lógarbundin j.) | U: | 62.000 | 23.850 |
| | **BU:** | **-350** | **-** |
| 18.1.07. Eftirlønir innan heilsuverkið (Lógarbundin j.) | U: | 13.500 | - |
| | **BU:** | **-400** | **-** |

### 3.38.3. Samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.3.19. KT-fyrisiting (Rakstrarj.) | U: | 4.420 | - |
| | **BU:** | **43** | **-** |

# § 5. Fiskivinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 4.145 | 4.145 | - |
| Løgu ætlan | 7.000 | 7.000 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 5.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.05. Fiskimálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 13.233 | - |
| | **BU:** | **81** | **-** |

### 5.31.1. Tilbúgving

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31.1.01. Tilbúgving á landi (Rakstrarj.) | U: | 2.815 | - |
| | **BU:** | **19** | **-** |
| 31.1.06. Tilbúgving á sjógvi (Rakstrarj.) | U: | 11.945 | - |
| | **BU:** | **71** | **-** |
| 31.1.07. Veðurtænastan (Rakstrarj.) | U: | 4.560 | - |
| | **BU:** | **8** | **-** |

### 5.33.2. Landbúnaðarstudningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 33.2.01. Almennar royndir og ráðgeving (Rakstrarj.) | U: | 2.670 | - |
| | **BU:** | **21** | **-** |
| 33.2.03. Búnaðarstovan (Rakstrarj.) | U: | 2.940 | - |
| | **BU:** | **20** | **-** |

### 5.34.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.1.01. Fiskivinnuráð og nevndir (Rakstrarj.) | U: | 441 | - |
| | **BU:** | **4** | **-** |
| 34.1.05. Hvalagransking og hvalateljing v.m. (Rakstrarj.) | U: | 981 | - |
| | **BU:** | **7** | **-** |

### 5.34.2. Tænasta og eftirlit

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.2.01. Fiskiveiðieftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 39.774 | - |
| | **BU:** | **2.231** | **-** |

### 5.34.3. Gransking og Menning

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.3.01. Havstovan (Rakstrarj.) | U: | 13.140 | - |
| | **BU:** | **121** | **-** |
| 34.3.04. Magnus Heinason (Rakstrarj.) | U: | 10.763 | - |
| | **BU:** | **1.562** | **-** |
| 34.3.06. Nýtt havrannsóknarskip (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **7.000** | **-** |

# § 6. Vinnumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 13.243 | 13.243 | - |
| Løgu ætlan | - | - | - |

Útr. Innt.
- Tús. kr. -

### 6.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.06. Vinnumálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 9.800 | - |
| | **BU:** | **68** | **-** |
| 11.1.22. Javnstøðunevndin (Rakstrarj.) | U: | 427 | - |
| | **BU:** | **3** | **-** |

### 6.21.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.1.13. Vanlukkutryggingarráðið (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **9** | **-** |
| 21.1.15. Umsiting av Vinnusjúkugrunninum (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **2** | **-** |

### 6.32.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 32.1.03. Jarðfeingi (Rakstrarj.) | U: | 11.089 | - |
| | **BU:** | **96** | **-** |
| 32.1.06. El-veiting, umsiting (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **10** | **-** |

### 6.35.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 35.1.08. Sjóvinnustýrið (Rakstrarj.) | U: | 7.650 | - |
| | **BU:** | **80** | **-** |

### 6.36.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 36.1.02. Umsiting av aliloyvum (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **4** | **-** |

### 6.37.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.1.15. Brúkaraumboð (Rakstrarj.) | U: | 1.100 | - |
| | **BU:** | **7** | **-** |
| 37.1.17. Kappingarráðið (Rakstrarj.) | U: | 1.800 | - |
| | **BU:** | **815** | **-** |
| 37.1.18. Skráseting Føroya (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **22** | **-** |
| 37.1.21. Tryggingareftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **15** | **-** |

### 6.37.2. Ymiskur studningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.2.11. Íverksetarahúsið í Klaksvík (Stuðulsj.) | U: | 800 | - |
| | **BU:** | **300** | **-** |

### 6.37.3. Alment riknar fyritøkur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.3.01. Rúsdrekkasøla landsins (Rakstrarj.) | U: | -16.848 | - |
| | **BU:** | **104** | **-** |

### 6.37.4. Ognarskrásetingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.4.07. Orkumál (Stuðulsj.) | U: | 2.400 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **BU:** | **3.600** | **-** |

### 6.37.5. Almennir karmar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 37.5.04. Heilsufrøðiliga starvsstovan (Rakstrarj.) | U: | 14.873 | - |
| | **BU:** | **658** | **-** |

### 6.38.2. Samferðsla

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.2.01. Strandfaraskip landsins (Rakstrarj.) | U: | 139.04 | - |
| | **BU:** | **7.374** | **-** |

### 6.38.3. Samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **28** | **-** |

### 6.38.5. Ferðavinna

| | | | |
|---|---|---|---|
| 38.5.01. Ferðaráð Føroya (Rakstrarj.) | U: | 14.000 | - |
| | **BU:** | **22** | **-** |

### 6.39.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 39.1.07. Arbeiðseftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 2.809 | - |
| | **BU:** | **26** | **-** |

# § 7. Mentamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 22.210 | 22.210 | - |
| Løgu ætlan | 13.500 | 13.500 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### 7.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.09. Mentamálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 16.829 | - |
| | **BU:** | **117** | **-** |

### 7.23.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.1.04. Studni (Rakstrarj.) | U: | 2.990 | - |
| | **BU:** | **18** | **-** |
| 23.1.13. Skúlabókagerð (Rakstrarj.) | U: | 507 | - |
| | **BU:** | **3** | **-** |
| 23.1.18. Nám (Rakstrarj.) | U: | 11.625 | - |
| | **BU:** | **116** | **-** |
| 23.1.31. Próvtøkur (Rakstrarj.) | U: | 9.085 | - |
| | **BU:** | **59** | **-** |

### 7.23.2. Fólkaskúlin v.m.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.2.01. Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | U: | 281.60 | - |
| | **BU:** | **2.377** | **-** |
| 23.2.02. Sernám (Rakstrarj.) | U: | 64.082 | - |
| | **BU:** | **531** | **-** |
| 23.2.06. Skúlatilboð til ung við breki (Rakstrarj.) | U: | 2.360 | - |
| | **BU:** | **18** | **-** |
| 23.2.98. Eftirskúli - tillaga verandi bygning (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **3.000** | **-** |
| 23.2.99. Eftirskúlin (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **700** | **-** |

### 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.3.02. Studentaskúlin og hf-skeiðið í Eysturoy (Løguj.) | U: | 10.000 | - |
| | **BU:** | **2.000** | **-** |
| 23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.) | U: | 195.08 | - |
| | **BU:** | **2.292** | **-** |
| 23.3.97. Lestraíbúðir (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **3.500** | **-** |
| 23.3.98. Miðnámsskúlatilboð til fø. Við serligum avbjóðingum | U: | - | - |
| | **BU:** | **2.500** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.3.99. Nýggj yrkisútbúgvingarskipam (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **500** | **-** |

### 7.23.5. Fólkaupplýsing

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.5.07. Frítíðarundirvísing (Rakstrarj.) | U: | 5.736 | - |
| | **BU:** | **6** | **-** |
| 23.5.10. Musikkskúlar (Rakstrarj.) | U: | 11.687 | - |
| | **BU:** | **677** | **-** |

### 7.23.6. Hægri útbúgvingar og gransking

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.6.05. Maritimir skúlar (Rakstrarj.) | U: | 26.085 | - |
| | **BU:** | **217** | **-** |
| 23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.) | U: | 72.132 | - |
| | **BU:** | **3.358** | **-** |
| 23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarj.) | U: | 2.348 | - |
| | **BU:** | **14** | **-** |

### 7.23.7. Lestrarstuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin j.) | U: | 127.47 | 720 |
| | **BU:** | **1.000** | **-** |

### 7.24.1. Ymsar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.1.07. Málnevndin (Rakstrarj.) | U: | 1.000 | - |
| | **BU:** | **8** | **-** |

### 7.24.2. Skapandi og útinnandi virksemi

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.2.01. Tónleikur og sangur (Stuðulsj.) | U: | 1.303 | - |
| | **BU:** | **600** | **-** |
| 24.2.04. Mentanargrunnurin (Stuðulsj.) | U: | 5.246 | - |
| | **BU:** | **1.512** | **-** |
| 24.2.05. Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarj.) | U: | 473 | - |
| | **BU:** | **3** | **-** |
| 24.2.06. Leiklist (Rakstrarj.) | U: | 5.515 | - |
| | **BU:** | **1.036** | **-** |
| 24.2.09. Tjóðleikhús (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **5.000** | **-** |

### 7.24.3. Mentanararvur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.3.03. Søvn Landsins (Rakstrarj.) | U: | 23.938 | - |
| | **BU:** | **2.175** | **-** |
| 24.3.06. Søvn landsins (Stuðulsj.) | U: | 7.690 | - |
| | **BU:** | **9** | **-** |
| 24.3.22. Listasøvn (Rakstrarj.) | U: | 2.195 | - |
| | **BU:** | **13** | **-** |

### 7.24.4. Fjølmiðlar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24.4.06. Kringvarp Føroya (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | **BU:** | **2.351** | **-** |

# § 11. Heilsumál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 1.283 | 1.283 | - |
| Løgu ætlan | 3.000 | 3.000 | - |

### Heilsutænastur

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| 20.2.99. Tannlæknatænasta (Rakstrarj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **800** | **-** |

### 11.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.24. Heilsumálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 11.736 | - |
| | **BU:** | **-1.426** | **-** |
| 11.1.55. KT-øki heilsuverksins (Rakstrarj.) | U: | 7.060 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | BU: | **28** | **-** |

### 11.20.1. Fyribyrging

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.1.04. Upplýsing og ráðgeving (Rakstrarj.) | U: | 2.237 | - |
| | BU: | **12** | **-** |

### 11.20.2. Heilsutænastur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.2.02. Heilsutrygd (Rakstrarj.) | U: | 7.800 | - |
| | BU: | **-462** | **-** |
| 20.2.03. Heilsutrygdarveitingar (Rakstrarj.) | U: | 150.70 | - |
| | BU: | **-4.400** | **-** |
| 20.2.04. Kommunulæknaskipanin (Rakstrarj.) | U: | 9.563 | - |
| | BU: | **70** | **-** |
| 20.2.05. Útbúgving av yngri læknum (Rakstrarj.) | U: | 6.308 | - |
| | BU: | **49** | **-** |
| 20.2.08. Apoteksverkið (Rakstrarj.) | U: | 0 | - |
| | BU: | **386** | **-** |
| 20.2.11. Ílegusavnið (Rakstrarj.) | U: | 1.509 | - |
| | BU: | **9** | **-** |

### 11.20.3. Sjúkrahúsverkið

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.3.04. Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | U: | 386.04 | - |
| | BU: | **3.993** | **-** |
| 20.3.10. Klaksvíkar sjúkrahús (Rakstrarj.) | U: | 62.324 | - |
| | BU: | **569** | **-** |
| 20.3.11. Klaksvíkar sjúkrahús (Løguj.) | U: | 5.000 | - |
| | BU: | **3.000** | **-** |
| 20.3.15. Suðuroyar sjúkrahús (Rakstrarj.) | U: | 52.110 | - |
| | BU: | **458** | **-** |
| 20.3.20. Serviðgerð uttanlands (Rakstrarj.) | U: | 135.28 | - |
| | BU: | **67** | **-** |
| 20.3.25. Hvíldarheimið Naina (Rakstrarj.) | U: | 2.001 | - |
| | BU: | **47** | **-** |
| 20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarj.) | U: | 2.058 | - |
| | BU: | **400** | **-** |
| 20.3.30. Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (Rakstrarj.) | U: | 2.058 | - |
| | BU: | **30** | **-** |

### 11.20.4. Viðgerðarstovnar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 20.4.02. Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (Rakstrarj.) | U: | 5.125 | - |
| | BU: | **282** | **-** |
| 20.4.03. Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (Rakstrarj.) | U: | 5.125 | - |
| | BU: | **285** | **-** |

### 11.21.3. Barnastuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.3.12. Gigni - heilsufrøði fyri børn & ung (Rakstrarj.) | U: | 11.275 | - |
| | BU: | **86** | **-** |

# § 12. Almannamál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 21.150 | 21.150 | - |
| Løgu ætlan | 400 | 400 | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |

### Barnastuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.3.99. Fountain House (Stuðulsj.) | U: | - | - |
| | BU: | **2.300** | **-** |

### 12.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.26. Almannamálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 14.197 | - |
| | BU: | **95** | **-** |

### 12.21.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.1.02. Almannaverkið (Rakstrarj.) | U: | 44.978 | - |
| | **BU:** | **1.293** | **-** |
| 21.1.06. KT-heildarskipan til Almannastovuna (Rakstrarj.) | U: | 5.000 | - |
| | **BU:** | **6** | **-** |
| 21.1.07. Hjálpartólamiðstøðin (Rakstrarj.) | U: | 6.951 | - |
| | **BU:** | **40** | **-** |
| 21.1.08. Dugni-skúlin (Rakstrarj.) | U: | 3.362 | - |
| | **BU:** | **25** | **-** |
| 21.1.09. Dugni-skúlin (Løguj.) | U: | - | - |
| | **BU:** | **400** | **-** |
| 21.1.12. Endurmenning (Rakstrarj.) | U: | 7.000 | - |
| | **BU:** | **54** | **-** |
| 21.1.19. Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark (Stuðulsj.) | U: | 948 | - |
| | **BU:** | **200** | **-** |

### 12.21.3. Barnastuðul

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.3.08. Børn og ung (Rakstrarj.) | U: | 48.608 | - |
| | **BU:** | **1.417** | **-** |

### 12.21.4. Sjúkradagpeningur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.4.01. Dagpeningaskipanin (Lógarbundin j.) | U: | 56.057 | 5.435 |
| | **BU:** | **-2.000** | **-** |

### 12.21.5. Studningur til eldri og brekað

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.5.01. Stuðul til feløg hjá brekaðum (Stuðulsj.) | U: | 3.714 | - |
| | **BU:** | **200** | **-** |

### 12.21.6. Eldri og brekað

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.6.01. Serforsorg (Rakstrarj.) | U: | 169.66 | - |
| | **BU:** | **1.183** | **-** |
| 21.6.04. Eldrarøkt (Rakstrarj.) | U: | 337.69 | - |
| | **BU:** | **7.265** | **-** |
| 21.6.19. Dugni-endurbúgving (Rakstrarj.) | U: | 6.069 | - |
| | **BU:** | **40** | **-** |
| 21.6.20. Sjóndepilin (Rakstrarj.) | U: | 6.016 | - |
| | **BU:** | **32** | **-** |

### 12.21.8. Sosialar pensjónir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21.8.05. Fyritíðarpensjón (Lógarbundin j.) | U: | 269.38 | - |
| | **BU:** | **10.000** | **-** |

### 12.34.4. Studningur til vinnu

| | | | |
|---|---|---|---|
| 34.4.04. Sjúkratrygd (Lógarbundin j.) | U: | 5.000 | - |
| | **BU:** | **-1.000** | **-** |

# § 15. Innlendismál

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 8.204 | 8.204 | - |
| Løgu ætlan | 3.000 | 3.000 | - |

Útr. Innt.
- Tús. kr. -

### 15.11.1. Fyrisiting

| | | | |
|---|---|---|---|
| 11.1.39. Innlendismálaráðið (Rakstrarj.) | U: | 10.200 | - |
| | **BU:** | **472** | **-** |

### 15.14.1. Ymiskar útreiðslur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14.1.01. Ymsar útreiðslur (Rakstrarj.) | U: | 950 | - |
| | **BU:** | **2** | **-** |
| 14.1.04. Føroya kærustovnur (Rakstrarj.) | U: | 5.645 | - |
| | **BU:** | **41** | **-** |

### 15.14.2. Skráseting og eftirlit

| | | | |
|---|---|---|---|
| 14.2.02. Dátueftirlitið (Rakstrarj.) | U: | 2.000 | - |
| | **BU:** | **14** | **-** |
| **15.30.1. Umhvørvi** | | | |
| 30.1.07. Náttúrufriðingarnevndir (Rakstrarj.) | U: | 316 | - |
| | **BU:** | **2** | **-** |
| **15.37.4. Ognarskrásetingar** | | | |
| 37.4.02. Umhvørvisstovan (Rakstrarj.) | U: | 21.010 | - |
| | **BU:** | **178** | **-** |
| **15.38.1. Vegir og havnir** | | | |
| 38.1.02. Landsverk (Rakstrarj.) | U: | 61.230 | - |
| | **BU:** | **441** | **-** |
| 38.1.07. Nýggir landsvegir (Løguj.) | U: | 37.000 | 100 |
| | **BU:** | **3.000** | **-** |
| **15.38.2. Samferðsla** | | | |
| 38.2.23. Sandoyartunnil | U: | - | - |
| | **BU:** | **7.000** | **-** |
| **15.38.4. Ferðslutrygd** | | | |
| 38.4.01. Akstovan (Rakstrarj.) | U: | -1.250 | - |
| | **BU:** | **54** | **-** |

# § 20. Inntøkur

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -311.620 | - | 311.620 |
| Løgu ætlan | - | - | - |

| | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. | kr. - |
| **20.50.2. Rentuinntøkur o.t.** | | | |
| 50.2.01. Rentuinntøkur av innistandandi | U: | 0 | 54.000 |
| | **BU:** | **-** | **-12.600** |
| **20.52.1. Skattainntøkur** | | | |
| 52.1.01. Vanligur landsskattur | U: | - | 1.253.000 |
| | **BU:** | **-** | **112.920** |
| **20.52.2. Avgjøld og tollur** | | | |
| 52.2.01. Meirvirðisgjald | U: | 125.00 | 1.445.000 |
| | **BU:** | **-** | **22.500** |
| 52.2.15. Avgjald á fiskatilfeingi | U: | - | - |
| | **BU:** | **-** | **195.000** |
| 52.2.22. Vegskattur (Vektgjald) | U: | - | 88.000 |
| | **BU:** | **-** | **5.000** |
| 52.2.25. Ferðaavgjald | U: | - | 16.000 |
| | **BU:** | **-** | **-3.000** |
| **20.54.1. Heildarveiting o.t.** | | | |
| 54.1.01. Heildarveiting o.t. | U: | - | 624.100 |
| | **BU:** | **-** | **-8.200** |

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samstykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 10. desember 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður Nielsen<br>formaður | Kristina Háfoss<br>næstformaður | Bill Justinussen |
| Jákup Mikkelsen | Rodmundur Nielsen | Eyðgunn Samuelsen |
| | Aksel V. Johannesen | |